Strandferðslan *frameftir*

Niðurstøður frá arbeiðsbólki MARS 2022

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Ministry of Finance

Design: Meitilberg.com

Innihald

1. Niðurstøður og tilmæli 4
1.1. Tænastusáttmáli 6
1.2. Strandferðslan sum sjálvstøðug eind 6
1.3. Ferjurnar hjá Strandferðsluni 7
1.4. Tilmæli 7

2. Inngangur 8
2.1 Arbeiðssetningur 8

3. Um Strandfaraskip landsins 10
3.1. Søguligt baksýni 12
3.2. Eitt sindur um virksemið 12
3.3. Ferjurnar hjá Strandferðsluni 19
3.4. Kostnaðurin av Strandferðsluni 20
3.5. Samanumtøka 23

4. Flutningsskylda og virksemi hjá Strandferðsluni 24
4.1. Reglur og krøv um virksemi 26
4.2. Hvat fevnir flutningsskyldan um 27
4.3. Tænastusáttmáli 28
4.4. Samferðslufyrisiting 29
4.5. Samanumtøka 30

5. Skipanarlig viðurskifti hjá Strandferðsluni 32
5.1. Um alment virksemi 34
5.2. Avbjóðingar hjá Strandferðsluni sum almennur stovnur 35
5.2.1. Rakstrarjáttan og roknskapur 36
5.2.2. Løgujáttan og skynsamur rakstur 37
5.3. Møguligar loysnir á avbjóðingunum hjá Strandferðsluni 37
5.3.1. Strandferðslan sum almennur stovnur 37
5.3.2. Strandferðslan sum sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag 38
5.4. Viðurskifti, sum broytast, um Strandferðslan verður sjálvstøðug eind . . 39
5.4.1. Játtan til virksemi 39
5.4.2. Hvørjar almennar reglur skulu galda 41
5.4.3. Sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag 42
5.5. Samanumtøka 43

Skjal 1: Arbeiðssetningur fyri arbeiðsbólkin fyri Strandferðsluna . . 45
Arbeiðið skal snúgva seg um 46
Manning av arbeiðsbólkinum 46
Tíðarætlan 46

Niðurstøður og tilmæli

1. Niðurstøður og tilmæli

Støðan hjá Strandferðsluni er ikki haldgóð. Bygnaðurin og karmarnir hjá stovninum stuðla ikki nóg væl undir virksemið. Leiðslan og starvsfólkini hava ikki nóg góðar arbeiðsumstøður at útinna virksemið og at leggja tað skynsamt til rættis. Tí hevur Strandferðslan avbjóðingar við at veita tær tænastur, sum samtíðin krevur, umframt at verandi bygnaður ikki framtíðartryggjar virksemið hjá Strandferðsluni.

Avbjóðingarnar, sum Strandferðslan hevur í dag, eru í grundini tær somu avbjóðingarnar, sum aðrar frágreiðingar um stovnin longu hava víst á.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað eru trý avgerandi viðurskifti, sum eiga at verða loyst fyrst. Mælt verður til, at flutningsskyldan verður gjørd ítøkilig í einum tænastusáttmála millum landið og Strandferðsluna, at Strandferðslan verður skipað sum sjálvstøðug eind, og at arbeiðið at endurnýggja ferjuflotan verður sett í gongd.

Tá ið tey viðurskiftini eru komin uppá pláss, skal ein ítøkilig virkisætlan gerast fyri, hvussu virksemið í framtíðini skal útinnast, og sum skal hækka tænastustigið og tryggja haldførið hjá Strandferðsluni.

1.1. Tænastusáttmáli

Lógarfesta flutningsskyldan hjá Strandferðsluni er yvirskipað, og tað er ikki nakað neyvari ásett um tænastustig, ferðaætlan, prísskipan o.a. Strandferðslan fær játtan fyri eitt ár í senn, og politiskar væntanir og krøv til Strandferðsluna kunnu vera ymisk og ógreið. Í stóran mun hevur politiski myndugleikin tikið ábyrgdina á seg støðugt at stýra og nágreina, hvat Strandferðslan skal og ikki skal. Tað er tí ein avbjóðing fyri stovnin at leggja virksemið til rættis og gera av, hvussu játtanin skal brúkast skilabest.

Arbeiðsbólkurin heldur, at yvirskipaða kravið í lógini um nøktandi reglubundnan flutning inniber, at politiski myndugleikin ítøkiliga tekur støðu til tey týðandi viðurskifti, sum tilsamans svara til ein tílíkan flutning. Politisku krøvini eiga at verða ásett í tænastusáttmála millum landið og Strandferðsluna fyri nøkur ár, har tað er greitt, hvat myndugleikin væntar, umframt at ein leistur er í sáttmálanum fyri, hvussu broytingar skulu gerast. Strandferðslan fær tá lagt rakstur og løgur til rættis eftir skipaðu ynskjunum um tænastur, prísskipan o.a.

Tað er umráðandi, at landið leggur neyðuga orku í, t.d. við at skipa eina samferðslueind, at gera sáttmála við Strandferðsluna, ískoyti um broytingar til sáttmálan og at hava eftirlit við sáttmálanum, umframt at gera yvirskipaðar samferðsluætlanir.

Ein tílík fyriskipan ger flutningsskylduna og -tænastuna ítøkiligari og gjøgnumskygdari, og politisku ynskini um samferðslu og broytingar í henni verða betur skipað í fastar karmar.

1.2. Strandferðslan sum sjálvstøðug eind

Strandferðslan er fevnd av reglum, sum galda fyri alment virksemi. Sambært játtanar- og roknskaparskipanini hjá landinum fær Strandferðslan eina árliga játtan til virksemið, men tað ber ikki til at hava avlop ella hall at flyta til næsta ár.

Stór sveiggj eru í rakstrinum hjá stovninum av serliga skiftandi oljuprísi og viðlíkahaldi. Tað ger, at stýringin í mun til játtanina í árinum fyllir nógv. Stovnurin má gera tillagingar, sum ikki altíð eru skynsamar, og frávik í mun til játtanina skulu viðgerast við eykajáttan í Løgtinginum, sum tekur tíð. Stovninum hevur tí heldur ikki góðar umstøður at leggja ætlanir fyri fleiri ár.

Tað eru nakrir greiðir fyrimunir við at leggja Strandferðsluna í eina sjálvstøðuga eind. Tað kann vera sum ein sjálvstøðugur stovnur ella eitt alment partafelag. Strandferðslan hevur tá sjálvstøðugan roknskap, og tað ber til at hava avlop og hall, sum kunnu flytast fram. Úrslitið í árinum hevur sjálvsagt týdning, men tá er ikki neyðugt at gera óskynsamar tillagingar bara fyri at halda játtanina í tí einstaka árinum.

Landið rindar Strandferðsluni tá eina upphædd sambært játtan og sáttmála. Strandferðslan má so skipa ein rakstur, sum klárar at rúma sveiggjum yvir ár.

Ein serstøk lóg skal gerast fyri Strandferðsluna við neyðugum ásetingum. Í lógini skulu vera ásetingar um serlig atlit og fortreytir fyri virkseminum.

Sjálvstøðugir stovnar og almenn partafeløg hava stýri og nevnd, sum eru evsti myndugleikin mótvegis politiska myndugleikanum, og sum eru strategiski samstarvsfelagin hjá stjórnini. Stjórnin og stýrið/nevndin hava tá eitt hóskandi forum til at viðgera ætlanir, avbjóðingar o.a.

Í spurninginum, um Strandferðslan skal vera sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag, er tað avgerandi, at Strandferðslan fær ein bygnað, sum er væl royndur áður, er vinnuegnaður, og har Strandferðslan kann útinna og leggja til rættis virksemi og løgur.

Um Strandferðslan verður partafelag, eigur støða at verða tikin til, um innlitslógin skal galda, og møguliga fyrisitingarlógin í ávísum málum. Í setanar- og lønarviðurskiftum kann felagið yvirtaka skyldurnar hjá stovninum, og felagið kann gera sáttmála við verandi fakfeløg. Starvsfólkaviðurskiftini eiga at verða viðgjørd í samstarvi við starvsfólk og fakfeløg.

1.3. Ferjurnar hjá Strandferðsluni

Miðalaldurin á ferjunum hjá Strandferðsluni er høgur. Tað hevur við sær høgar útreiðslur til viðlíkahald og annan rakstur, og at ferjurnar ikki liva upp til nútímanskrøv, hvørki til ferðafólk ella manning. Tað er størsta einstaka rakstrarliga avbjóðingin hjá Strandferðsluni.

Arbeiðsbólkurin heldur, at arbeiðið at endurnýggja ferjuflotan eigur at verða sett í gongd, soleiðis at Strandferðslan innan rímuliga tíð hevur ein flota, sum er tíðarhóskandi og fullnýtir teir rakstrarligu fyrimunirnar, sum eru møguligir í dag.

1.4. Tilmæli

- At tænastusáttmáli verður gjørdur við Strandferðsluna, har politisku ynskini um samferðslu í Føroyum verða skipað í hóskandi og fastar karmar, og at sáttmálin hevur greið krøv um tænastustig, ferðaætlan, prísskipan o.a.
- At Strandferðslan verður skipað sum sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag fyri at tryggja betri umstøður at leggja raksturin til rættis
- At arbeiðið at endurnýggja ferjuflotan verður sett í gongd

2. Inngangur

Ásannandi, at Strandfaraskip landsins er ein av stóru og týðandi stovnum landsins – fyri borgarar, tað almenna og vinnuna –, hevur landsstýrismaðurin ynskt at fáa lýst og mett um virksemið hjá Strandferðsluni og at fáa uppskot til broytingar og betringar.

Í mai 2021 orðaði landsstýrismaðurin ein arbeiðssetning og setti ein arbeiðsbólk, sum skuldi hava neyðuga vitan og sakkunnleika at fremja arbeiðssetningin. Í bólkinum hava verið:

- Rúni Vang Poulsen, formaður
- Jóhanna á Bergi
- Søren Lunell Bruhn
- Durita Tausen

Durita Tausen tók seg úr bólkinum, áðrenn frágreiðingin var liðug. Djóni Højgaard og Eli Christiansen, fulltrúar í Fíggjarmálaráðnum, hava verið skrivarar hjá arbeiðsbólkinum.

Arbeiðsbólkurin byrjaði arbeiðið 2. juni 2021. Bólkurin hevur á fundum og í samskifti annars við Strandferðsluna kunnað seg um virksemi, tørv og avbjóðingar hjá Strandferðsluni. Fundir hava eisini verið við:

- Jóhan Paula Helgason, leiðara á menningardeildini hjá Visit Faroe Islands og skrivara í frágreiðing um útveitan av sjóvegis farleiðum frá 2015
- Olgu Biskupstø, samskipara í Útoyggjafelagnum
- Onnu Borg Dahl og Anni á Hædd frá Vinnumálaráðnum, og Jákup Kristian Poulsen og Hanus Mikkelsen frá Sjóvinnustýrinum, sum varða av lóggávuni á sjógvi, sum Strandferðslan virkar undir
- Borgarstjórar og onnur umboð fyri Tórhavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu, Runavíkar kommunu og Sunda kommunu

Fundir og samskifti hava verið við Halldór Jörgensson frá Vegagerðin og Rasmus Shermer og Michael Birch frá Transportministeriet um, hvussu samferðsluøkið í Íslandi og Danmark verður umsitið og aðrar viðkomandi spurningar. Kim Nordling frá Transportbyrån og Martin Christiansen frá Finansdepartementet hava svarað spurningum um Áland og Grønland.

Strandferðslan hevur útvegað upplýsingar og tilfar eftir tørvi. Arbeiðsbólkurin hevur kunnað seg um annað tilfar, undir hesum um tænastusáttmálar, og hvussu samferðsla er skipað í okkara nærmastu grannalondum. Harumframt hava undanfarnar frágreiðingar um Strandferðsluna givið síni íkast.

2.1 Arbeiðssetningur[1]

Sambært arbeiðssetninginum skal arbeiðsbólkurin gera ein frágreiðing, sum lýsir søguliga baksýni og Strandferðsluna, fyrimunir og vansar við ymiskum stýrissløgum, og hvussu stýringin millum landið og stovnin/fyritøkuna kann vera við einum tænastusáttmála.

Setningurin fevnir eisini um at meta um, hvørt Strandferðslan skal útinna raksturin, ella um hon skal gera ætlanir um, fyrireika og keypa samferðslutænastur, umframt at meta um, hvørjar tænastur Strandferðslan skal veita, og hvussu prísir og fráferðir skulu ásetast.

Arbeiðsbólkurin hevur miðað eftir at fáa lýst tær mest átrokandi avbjóðingarnar, sum Strandferðslan hevur. Bólkurin ásannar, at spurningurin um útveiting o.tíl. er gjølla viðgjørdur í frágreiðing frá 2015, og hevur tí ikki neyvari greinað, hvør skal útinna raksturin, men hevur tó umrøtt útveiting o.tíl., tá ið tað er viðkomandi, fyrst og fremst saman við flutningsskyldu og tænastusáttmála. Í spurninginum um tænastur, prísir og fráferðir hevur bólkurin ikki neyvt viðgjørt, hvussu ferðaætlan, prísskipan o.a. skulu síggja út, men eru meginreglulig atlit umrødd saman við flutningsskyldu og tænastusáttmála.

Arbeiðsbólkurin hevur lagt seg eftir at koma við tilmælum til politiska myndugleikan um, hvørjar grundleggjandi loysnir kunnu vera til avbjóðingarnar hjá Strandferðsluni. Bólkurin hevur skipað frágreiðingina í hesir partarnar:

- Um Strandferðsluna, partur 3
- Um flutningsskyldu og virksemi hjá Strandferðsluni, partur 4
- Um skipanarlig viðurskifti hjá Strandferðsluni, partur 5

[1] Arbeiðssetningurin er hjálagdur sum skjal 1.

Fyri hvønn part er til síðst tikið saman um tað mest týðandi í partinum.

Strandferðslan er fleiri ferðir viðgjørd í álitum og frágreiðingum.

Í 2000 varð drúgv frágreiðing gjørd um karmar fyri framtíðarvirksemið hjá Strandferðsluni. Í 2007 kom aftur ein frágreiðing, sum hevði uppskot um framtíðarvirksemið hjá stovninum. Í báðum frágreiðingunum varð lagt upp til at leggja Strandferðsluna í eitt alment partafelag og á tann hátt geva Strandferðsluni betri karmar at skipa virksemið.

Í 2015 varð frágreiðing gjørd um útveitan av sjóvegis farleiðunum, og tann arbeiðsbólkurin mælti eisini til at umskipa Strandferðsluna fyri at skapa eitt betri grundarlag undir einum skynsomum og úrslitagóðum rakstri.

Í 2017 gjørdi Knud E. Hansen eina frágreiðing við støðumeting av skipaflotanum hjá Strandferðsluni. Høvuðsniðurstøðan var, at flotin var alt ov gamal, og at einasta loysnin var endurnýggjan við nýggjum skipum.

Í sambandi við at útbjóðingartilfar til nýggjar bussáttmálarnar varð gjørt, fekk Strandferðslan í 2019 ráðgevingarfyritøkuna at gera eina lýsing av støðuni, um tær elstu ferjurnar vórðu skiftar út, hvørjar sparingar vóru, og hvussu raksturin kundi skipast.

Hóast frágreiðingar og álit er ikki nógv gjørt við skipanarligu viðurskiftini hjá Strandferðsluni. Farmaleiðir vórðu seldar frá í 2006, og stovnurin varð fluttur úr Havn til Tvøroyrar í 2009.

Um ***Strand-faraskip landsins***

3.
Um Strandfaraskip landsins

Strandferðslan er ein týðandi stovnur hjá landinum og hevur nógv at týða í gerandisdegnum hjá nógvum borgarum. Fyri at fáa eina fatan av stovninum og umstøðunum verður á næstu síðunum greitt frá samferðsluni og virkseminum, sum Strandferðslan útinnir í dag.

3.1. Søguligt baksýni

Fyrsta rutuskipið í Føroyum var Smiril og var sett í sigling í 1896. A/S Mortensens Eftf. á Tvøroyri læt eitt dampskip byggja í Malmø fyri 70.000 kr. Danskir myndugleikar lótu 12.000 kr. um árið til felagið. Mortensensmenn høvdu áður skipini Føringur 1 og 2, men tey vórðu brúkt til farmasigling. Smiril sigldi 10 míl og røkti sambandið millum Suðuroy og Havnina, men hevði eisini ferðaætlan til aðrar bygdir. Amtið yvirtók skip og rutu í 1917.

Nýggir Smirlar (seinni við y) eru bygdir, men bilferja kom tó ikki fyrrenn í 1975, tá ið Morten Mols varð keyptur úr Danmark. Í 1980 kom systurskipið Mikkel Mols og fekk navnið Teistin. Á Suðuroyarleiðini var fyrstu tíðina langt millum túrarnar, og so seint sum í 1950'unum kundi tað taka einar átta tímar til Havnar, tí leggjast skuldi at allastaðni norðureftir.

Av øðrum kann nevnast, at frá 1908 fór Thorshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik at sigla eftir mjólk til havnarfólk, og gjørdi felagið eisini avtalu um at flyta post. Felagið brúkti motorbátar og onkur skip til at sigla til Sandoyar og norðanfjørðs. Annað dømi er, at Kjølbro fekk sær rutubátar. Hann yvirtók rutuna millum Leirvík og Klaksvík í 1935 og setti eina slupp í rutu millum Havnina og Klaksvík. Sum heild kann sigast, at burtursæð frá Suðuroyarleiðini var sjóvegis rutusamband yvirhøvur á privatum hondum.

Løgtingið fekk rætt til alla strandfarasigling í 1939. Tó slapp m.a. Meiaríið at halda fram við sínum mjólkarbátum. Í 1946 kom Ternan, sum sigldi Skálafjarðar- og Sundalagsleiðina og onkra aðra leið, og seinni onnur skip. Í 1960-70'unum hevði Strandferðslan yvirtikið allar rutunar í landinum og skipini. Strandferðslan fekk t.d. bilferjuna Trónd í 1967. Seinni sigldi Dúgvan, keypt í 1985, inn á Skálafjørðin nøkur ár, men rutan varð niðurløgd, tá ið vegakervið var væl útbygt. Smidligari var at koyra, men kanska ikki líka persónligt og prátingarsamt[2].

Samferðslan hevur sum heild verið fyri stórum broytingum. Umframt brúnna um Streymin í 1973 og Norðskálatunnilin í 1976 eru fleiri týðandi tunlar, vegir og havnir gjørd. Í nýggjari tíð hava undirsjóvartunlar broytt samferðslumynstrið og samferðslumøguleikarnar í Føroyum.

Tað er soleiðis ikki so løgið, at umstøðurnar hjá Strandferðsluni eisini broytast javnan. Ikki bara í mun til framdar útbyggingar, men eisini í mun til tann tørv, sum altíð er á samferðslu, og tey krøv, sum vit hava um tænastu, skjótleika, høgleika, smidleika o.a. í dag.

Tað er tí hóskandi at spyrja, hvussu Strandferðslan klárar at útinna sítt virksemi. Hevur hon møguleika til at leggja virksemi og løgur soleiðis til rættis, at hon væl megnar at svara tí tørvi, sum er nú og nøkur ár fram, men at eisini at gera hóskandi tillagingar, so hvørt umstøðurnar broytast. Er Strandferðslan rætt skipað í mun til uppgávurnar, ella er ein annar formur ella ein onnur skipan betur egnað til at útinna virksemið, stýra tí og at fáa sum mest burturúr?

3.2. Eitt sindur um virksemið

Strandferðslan rekur níggju sjóvegis farleiðir. Stovnurin hevur níggju ferjur til endamálið. Av teimum er ein bátur langtíðarleigaður til leiðina til Mykines og annars at vera tøkur til leiðirnar til Fugloy/Svínoy og Skúvoy. Landvegis farleiðirnar eru 24 í tali og eru útveittar til privatar veitarar. Um 40 bussar, íroknað eykabussar, eru til endamálið.

Á farleiðunum hjá Strandferðsluni ferðast árliga eini 1,2 mió. fólk; 700 tús. við Oyggjaleiðum og 500 tús. við Bygdaleiðum. Við ferjunum eru 170-175 tús. akfør árliga. Í mars 2020 rakti koronufarsóttin landið, og sást tað aftur í ferðafólkatalinum, men ikki stórvegis í akførum. Strandferðslan væntar, at ferðslutølini fara at liggja á somu legu sum fyri koronufarsóttina.

Talið av ferðafólkum og akførum fyri hvørja farleið sæst í talvu 1 og talvu 2.

[2] Upplýsingarnar um søguna eru m.a. fingnir úr bókini "Føroyar og bankarnir í 100 ár", s. 204-221.

Talva 1
Oyggjaleiðir

	2017	2018	2019	2020	2021
Ferðafólk					
Suðuroy	250.305	275.207	264.298	226.772	264.502
Sandoy	208.189	212.915	219.076	185.377	223.587
Hestur	6.264	6.357	5.931	4.831	5.661
Nólsoy	101.097	96.435	100.873	77.648	87.244
Kalsoy	57.306	57.594	69.103	45.461	53.899
Fugloy/Svínoy	14.563	17.789	18.751	16.213	18.169
Skúvoy	5.287	3.152	5.726	4.117	4.854
Mykines	20.629	19.790	29.421	10.614	16.782
Tilsamans	**663.640**	**689.239**	**713.179**	**571.033**	**674.698**
Akfør					
Suðuroy	98.679	108.833	105.456	96.403	110.704
Sandoy	31.757	33.970	53.649	61.296	71.007
Hestur	449	412	262	410	455
Nólsoy	5.447	4.721	5.303	5.054	5.495
Kalsoy	7.964	8.285	9.670	6.901	7.788
Fugloy/Svínoy	19	24	32	26	33
Tilsamans	**144.315**	**156.245**	**174.372**	**170.090**	**195.482**

Talva 2 **Bygdaleiðir**	2017	2018	2019	2020	2021
Ferðafólk					
Tórshavn-Vestmanna	32.285	31.897	31.264	17.963	21.065
Tórshavn-Gamlarætt	20.737	19.251	20.162	12.271	15.175
Oyrabakki-Eiði	15.207	16.063	13.097	10.380	12.137
Oyrabakki-Gjógv	870	812	1.189	307	375
Oyrabakki-Tjørnuvík	1.890	1.965	1.556	996	932
Sundalagið-Kambsdalur				240	3.736
Tórshavn-Flogvøllur	78.587	79.571	79.675	40.943	54.913
Glasir-Sørvágur-Tórshavn				804	3.004
Tórshavn-Klaksvík	127.607	135.135	128.655	78.854	75.035
Toftir-Tórshavn	7.332	7.357	6.744	4.981	13.281
Fuglafjørður-Klaksvík	70.339	68.580	65.571	52.833	61.095
Skálafjarðarleiðin	72.205	69.207	69.400	46.343	44.922
Glyvrar-Æðuvík	464	612	458	350	464
Kambsdalur-Skálafjørður-Toftir				1.035	13.777
Skálafjørður-Kollafjørður				55	18.713
Oyrabakki-Kollafjørður					82
Skálafjørður-Oyndarfjørður	1.852	2.044	1.806	2.290	1.869
Klaksvík-Viðareiði	15.558	13.779	10.984	4.251	4.426
Klaksvík-Kunoy	315	316	1.278	1.503	1.341
Syðradalur-Trøllanes	5.371	6.040	9.693	7.456	12.268
Skopun-Skálavík	13.745	14.556	15.942	10.129	12.032
Sandur-Dalur	1.285	1.269	880	549	886
Tvøroyri-Sumba	28.310	32.874	30.236	18.503	28.268
Fámjin-Sandvík	6.349	5.649	5.995	6.786	5.596
Tilsamans	**500.308**	**506.977**	**494.585**	**319.822**	**405.392**

Sum sæst á myndunum 3-5, er gongdin í ferðslutølunum, at støðugt fleiri ferðandi eru við Oyggjaleiðum, men færri við Bygdaleiðum. Fólkatalið veksur, fólk ferðast meira í landinum, og ferðafólk koma til landið. Strandferðslan hevur greitt frá, at tað eru aðrir møguleikar at ferðast landvegis enn við Bygdaleiðum. Fleiri bilar eru í landinum; við ársbyrjan 2022 vóru 41.588 akfør (27.451 persónbilar) í mun til 30.431 (20.136) í 2009. Havast kann eisini í huga, at Bygdaleiðir í størri mun hava fyrilit fyri fleiri áhugamálum í dag, t.d. skúlar og frítíðarítriv, enn áður, tá ið Bygdaleiðir fyrst og fremst vóru víðari farleiðir, sum vóru knýttar at ferjunum.

Talið av akførum við ferjunum er vaksið. Tó er tað fyrst minkað og síðani vaksið aftur á Sandoyarleiðini. Vøksturin í akførum á Sandoyarleiðini stavar í stóran mun frá vinnuligum virksemi, undir hesum arbeiðinum við Sandoyartunlinum.

Næstu myndirnar vísa gongdina, sum hevur verið í ferðslutølunum hjá Oyggjaleiðum og Bygdaleiðum árini 2010-2021.

Mynd 3 **Oyggjaleiðir – Ferðafólk**



Í 2021 var ferðafólkatalið á Suðuroyar- og Sandoyarleiðini sum í 2019, t.e. áðrenn korona, men á Mykines-, Kalsoyar- og Nólsoyarleiðunum var talið nakað lægri í mun til 2019.

Mynd 4 **Oyggjaleiðir – Akfør**



Korona ávirkaði serliga flutningin av akførum á Suðuroyar- og Kalsoyarleiðunum, men á Sandoyarleiðini er talið av akførum vaksið.

Mynd 5 **Bygdaleiðir – Ferðafólk**



Alsamt færri fólk hava koyrt við Bygdaleiðum síðstu árini. Korona hevur ávirkað nógv. Onkrar av minnu leiðunum eru tó vaksnar, og onkur nýggj leið er.

Strandferðslan førir farm sjóvegis umframt landvegis, har vinnugrundarlagið er ivasamt. Stovnurin hevur fimm lastbilar og annan útbúnað til farm, umframt er avtala við privat felag um at flyta størri nøgdir av farmi til Sandoynna. Farstøðir og farmastøðir eru í Klaksvík, Tórshavn og á Tvøroyri. Stovnurin stendur fyri skipaavgreiðsluni, har ferjurnar leggja at.

Farmaflutningurin er allarmest á Suðuroyar- og Sandoyarleiðunum og er vaksin nógv síðstu árini, sí talvu 6. Standferðslan hevur greitt frá, at vøksturin kemst av m.a. fiskaframleiðslu og aling, og roknar við, at gongdin heldur fram, serliga á Suðuroyarleiðini, har virkir í oynni hava ætlanir innan aliframleiðslu. Á Sandoyarleiðini eru farmatølini nógv ávirkað av arbeiðinum við Sandoyartunlinum. Hasfjord varð settur í sigling í 2020 at føra farm á Sandoyarleiðini.

Farmaflutningur á øðrum oyggjaleiðum er mest av landbrúki. Stórvegis mongdir eru ikki sum fyrr, tá ið mjólkaframleiðsla var í fleiri oyggjum. Tó er øktur tørvur á Svínoyarleiðini av aling.

Talva 6

Oyggjaleiðir	**2014**	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2021**
Farmur o.a.[3]								
Suðuroy, sleip/lastir	8.194	9.175	10.344	9.938	10.623	11.179	12.262	13.245
Suðuroy, akfør > 9m	1.150	1.156	960	1.126	1.530	1.542	1.670	1.470
Suðuroy, akfør u/førara	944	1.974	2.146	2.354	2.292	2.693	2.488	2.488
Sandoy, akfør > 9m	1.125	1.250	1.650	1.876	2.421	3.991	6.536	6.328
Tilsamans	**11.413**	**13.555**	**15.100**	**15.294**	**16.866**	**19.405**	**22.956**	**23.531**

[3] Tølini í talvuni, uttan "Suðuroy, sleip/lastir", eru við í "akfør" í talvu 1. Eindirnar svara til einar 2,5 persónbilar.

Talva 7 Oyggjaleiðir	Túrar/ viku	Árligur førleiki	Ferðslutøl 2019 Ferðsla	Pr. túr	Nýtsla	Ferðslutøl 2020 Ferðsla	Pr. túr	Nýtsla
Ferðafólk								
Suðuroy	36	1.699.200	264.298	141,2	15,6%	226.772	121,1	13,3%
Sandoy	122	1.827.072	219.076	34,5	12,0%	185.377	29,2	10,1%
Hestur	36	539.136	5.931	3,2	1,1%	4.831	2,6	0,9%
Nólsoy	84	949.872	100.873	23,1	10,6%	77.648	17,8	8,2%
Kalsoy	86	514.280	69.103	15,5	13,4%	45.461	10,2	8,8%
Fugloy/Svínoy	21	98.700	18.751	17,2	19,0%	16.213	14,8	16,4%
Skúvoy	60	132.000	5.726	1,8	4,3%	4.117	1,3	3,1%
Mykines (4 mð.)	28	38.752	29.421	60,7	75,9%	10.614	21,9	27,4%
Tilsamans	**473**	**5.799.012**	**713.179**	**30,2**	**12,3%**	**571.033**	**24,2**	**9,80%**

Á Oyggjaleiðum eru í miðal 473 fráferðir um vikuna, sí talvu 7. Av hesum eru eini 100 túrar tilkalling. Umframt siglir Hasfjord 40 túrar um vikuna við farmi á Sandoyarleiðini. Talið av fráferðum er broytt nakað yvir tíð. Mett verður, at talið er vaksið 15-20% seinastu árini.

Tað er ymiskt, hvussu nógv ferðafólk eru við ymiskar túrar, men Strandferðslan sigur, at tað sjáldan kemur fyri, at ferjurnar mestsum eru fullfermdar við fólki, bara til stevnur o.til. Á mynd 8 sæst talið á fráferðum hjá Smyrli í 2021, alt eftir hvussu nógv ferðafólk vóru við.

Tá ið tað ræður um akfør og farm, er torført at gera upp, hvussu nógv ferjurnar eru fermdar. Akfør, sleip o.a. hava ymiska stødd, og tað er ymiskt, hvussu stórt dekksplássið er, alt eftir hvussu nógv er sett av til farm, herundir um bilrampurnar kunnu brúkast.

Akfør og farmur eru fyrst og fremst á Suðuroyar- og Sandoyarleiðunum, og tað er har, at avbjóðingar kunnu vera við at fáa alt við, umframt á onkrum summartúrum á Kalsoyarleiðini. Seinastu árini er tað oftari og oftari komið fyri, at Smyril er fullfermdur við akførum og farmi, serliga á túrum í dagtímunum. Tað hevur við sær ávíst trýst á bæði skip og kringumstøður á havnaløgunum, og

Mynd 8 **Fráferðir hjá Smyrli eftir ferðafólkatali**



Smyril kann hava 975 ferðafólk umborð í apríl-oktober og 800 hinar mánaðirnar. Í 2021 vóru færri enn 200 ferðafólk við á um 80% av fráferðunum.

til tíðir hevur tað við sær misnøgd millum ferðafólk og vinnu, hvør nú hevur fyrstarætt at sleppa við.

Umframt inntøkur frá flutningi av ferðafólkum, akførum og farmi hevur Strandferðslan eisini inntøkur frá sølu umborð á Smyrli (kafeteria og kiosk) og á Teistanum (matsøla).

Á Bygdaleiðum eru í miðal fyri árið 1.500 fráferðir um vikuna, sí talvu 9. Bussarnir eru ymiskir í stødd, alt eftir hvørja farleið teir røkja, og nær teir koyra. Onkrar broytingar eru gjørdar á ymisku leiðunum, men samlaða talið av túrum er ikki mett at vera broytt serliga nógv seinastu árini. Busssáttmálarnir fevna um ávíst tímatal, og kunnu tillagingar gerast innan ásett mørk. Er broytingin meira enn 10%, verður gjaldið til veitaran broytt.

Í 2019 vóru flest ferðandi á leiðunum Tórshavn-Klaksvík og Tórshavn–Flogvøllur. Í miðal vóru ávikavist 20 (2020: 12) og 14 (2020: 7) fólk við hvønn túr á teimum leiðunum. Harafturímóti eru nakrar leiðir, sum eru sera lítið brúktar, t.d. leiðin millum Sand og Dal og leiðirnar millum Oyrabakka og ávíkavist Gjógv og Tjørnuvík, har bussurin ofta koyrir tómur. Á fundi við størru kommununurnar nevndu tær, at bussleiðirnar ikki altíð passaðu til tørvin hjá kommununum. Somuleiðis vísti Visit Faroe Islands á, at Bygdaleiðir passa illa til tørvin hjá ferðafólk-

Talva 9	Túrar/	Árligur	Ferðslutøl 2019			Ferðslutøl 2020		
Bygdaleiðir	**viku**	**førleiki**	**Ferðsla**	**Pr. túr**	**Nýtsla**	**Ferðsla**	**Pr. túr**	**Nýtsla**
Ferðafólk								
Tórsh.–Vestmanna	87	213.150	31.264	7,2	14,7%	17.963	4,1	8,4%
Tórsh.–Gamlarætt	54	132.300	20.162	7,5	15,2%	12.271	4,5	9,3%
Oyrabakki–Eiði	58	101.850	13.097	4,5	12,9%	10.380	3,6	10,2%
Oyrabakki–Gjógv	20	19.920	1.189	1,2	6,0%	307	0,3	1,5%
Oyrab.–Tjørnuvík	33	31.350	1.556	0,9	5,0%	996	0,6	3,2%
Sundalagið–Kambsd.	4	11.000		0,0	0,0%	240	1,2	2,2%
Tórshavn–Flogvøllur	114	279.300	79.675	14,0	28,5%	40.943	7,2	14,7%
Glasir–Sørv.–Tórsh.	36	88.200		0,0	0,0%	804	0,4	0,9%
Tórshavn–Klaksvík	130	318.500	128.655	19,8	40,4%	78.854	12,1	24,8%
Toftir–Tórshavn	20	49.000	6.744	6,7	13,8%	4.981	5,0	10,2%
Fuglafj.–Klaksvík	218	515.933	65.571	6,0	12,7%	52.833	4,8	10,2%
Skálafjarðarleiðin	179	403.200	69.400	7,7	17,2%	46.343	5,2	11,5%
Glyvrar–Æðuvík	18	14.400	458	0,5	3,2%	350	0,4	2,4%
Kamb.–Skál.–Toftir	8	18.000		0,0	0,0%	1.035	2,6	5,8%
Skálafj.–Oyndarfj.	32	25.600	1.806	1,1	7,1%	2.290	1,4	8,9%
Klaksvík–Viðareiði	62	80.132	10.984	3,6	13,7%	4.251	1,4	5,3%
Klaksvík–Kunoy	16	20.852	1.278	1,6	6,1%	1.503	1,9	7,2%
Syðrad.–Trøllanes	84	109.200	9.693	2,3	8,9%	7.456	1,8	6,8%
Skopun–Skálavík	80	168.000	15.942	4,0	9,5%	10.129	2,5	6,0%
Sandur–Dalur	65	65.000	880	0,3	1,4%	549	0,2	0,8%
Tvøroyri–Sumba	96	153.600	30.236	6,3	19,7%	18.503	3,9	12,0%
Fámjin–Sandvík	86	77.220	5.995	1,4	7,8%	6.786	1,6	8,8%
Tilsamans	**1.500**	**2.895.707**	**494.585**	**6,6**	**17,1%**	**319.822**	**4,3**	**11,0%**

um. Eitt annað er, at bussrutur við sera fáum ferðandi er ein umhvørvislig avbjóðing.

Tyrluflúgving er sambært sáttmála millum landsstýrið og Atlantic Airways fyri 10 ár í senn. Flogfelagið fær 44,4 mió. kr. um árið fyri tænastuna, harav 14,3 mió. kr. eru fyri innanoyggja flúgving; restin er til leiting og bjarging. Innanoyggja flúgvingin verður goldin av serstakari kontu, sum Strandferðslan umsitur. Flogfelagið fær inntøkurnar av flúgvingini.

3.3. Ferjurnar hjá Strandferðsluni

Við ársbyrjan 2021 var miðalaldurin á ferjunum hjá Strandferðsluni í miðal 33 ár, sí mynd 10; 31 ár, eftir at Spógvin varð seldur í vár. Av teimum elstu eru Ritan (1971), Sam (1975) og Hasfjord (1975). Onkrar ferjur eru umbygdar ella tillagaðar til tørvin á farleiðunum.

Til samanberingar kann nevnast, at Smyril-Line hevur seks skip. Miðalaldurin er 28 ár, men fimm av skipunum reka farmaflutning burturav og eru eldri enn Norrøna, t.d. eru Eystnes og Hvítanes frá 1980. Norrøna er 18 ára og varð umvæld/endurnýggjað veturin 2020/2021.

Í Íslandi verða fimm farleiðir roknaðar sum partur av vegakervinum, og verða tær stuðlaðar av vega- og strandamyndugleikanum Vegagerðin. Tað eru fýra ferjur og ein bátur, sum røkja farleiðirnar. Miðalaldurin á ferjunum er 23 ár (ein teirra er væl eldri enn hinar).

Annað dømi er Molslinjen, sum rekur nakrar ferjuleiðir í Danmark og til Svøríkis og Týsklands. Reiðaríið hevur 15 skip til endamálið. Miðalaldurin er 19 ár, harav Sønderho er frá 1962 og Povl Anker er frá 1978 (14 ár, um tær ferjurnar ikki eru við). Molslinjen fær Express 5 í 2022.

Í frágreiðing frá Knud E. Hansen til Strandferðsluna í 2017 varð vístá, at flotin var rættiliga gamal. Aldurin hevði serliga við sær, at lastaevnini vóru minkað munandi, og at tæringar í skrokkinum vóru farnar at gera um seg. Umstøðurnar til ferðafólk og manning eru ikki tíðarhóskandi umborð á gomlum skipum. Fyritøkan gav Smyrli og Teistanum góð skoðsmál. Av hinum fýra ferjunum varð

Mynd 10 **Miðalaldur á ferjunum**



Av stóru ferjunum hjá Strandferðsluni er Smyril frá 2005 og Teistin frá 2001. Nýggjur Sildberi kom í 2014, men var tá 20 ára gamal. Erla Kongsdóttir kom í 2020. Somuleiðis var Hasfjord keyptur, men var tá 45 ára gamal.

Ternan mett at vera frægast fyri. Tær ferjurnar nærkaðust tá einum miðalaldri uppá 40 ár. Truplu umstøðurnar við lendingarnar í Svínoy, Fugloy og Skúvoy høvdu stóran týdning fyri lágu heildarmetingarnar av Rituni og Sildberanum.

Smyril og Teistin eru í rakstri í einar 18 tímar um dagin; hinar ferjurnar um 12 tímar. Umleið 2/3 av tíðini fer til sigling. Smærru farleiðirnar hava tveir steðgir gjøgnum dagin. Siglingin út í Mykines er frá apríl til oktober. Strandferðslan hevur Erlu Kongsdóttur sum eykaskip, men má leiga ferju, tá ið Smyril ikki kann sigla. Landsstýrið ætlar at útvega Strandferðsluni eina ferju afturat til Suðuroyarleiðini, fyrst og fremst til farm.

Smyril og Teistin sigla umleið 4.600 tímar um árið; tær eldru sigla 2.500-3.300 tímar. Alt eftir tímatalinum er tað ymiskt, nær klassing av skrokkinum og maskinarínum er, somuleiðis nær umvælingar verða gjørdar. Tað kemur fyri, at størru ferjurnar ikki eru í sigling onkrar túrar; tær smærru onkrar dagar. Tað veri seg av ótilrættaløgdum umvælingum ella veðri.

Tað, at ferjurnar hjá Strandferðsluni hava ein høgan miðalaldur og hava so nógvar fráferðir hvønn dag í árinum, umframt at bara Erla Kongsdóttir er eykaskip, hevur øktan rakstrarváða við sær, at farleiðir ikki kunnu verða røktar til fulnar, um onkur ferja hjá stovninum fær brek.

3.4. Kostnaðurin av Strandferðsluni

Strandferðslan fær rakstrarjáttan í fíggjarlógini. Sum sæst í talvu 11, fevnir játtanin i 2021 um rakstrarinntøkur uppá 69,7 mió. kr. og rakstrarútreiðslur uppá 271,9 mió. kr., t.e. netto 202,2 mió. kr. Stovnurin fær eykajáttanir mestsum á hvørjum ári. Í 2018-2021 hava tær ligið frá 2,2 til 23,6 mió. kr. Játtanin fevnir eisini um viðlíkahald og minni íløgur.

Oyggjaleiðir eru størsti parturin av virkseminum hjá Strandferðsluni. Stovnurin hevur níggju ferjur til endamálið; tó er báturin til Mykinesleiðina langtíðarleigaður

Talva 11
Rakstur

		2017	%	2018	%	2019	%	2020	%	2021já	%
Oyggjaleiðir	Inntøkur	-48.389	34	-53.233	35	-57.098	34	-51.250	29	-54.766	29
	Útreiðslur	142.267		150.001		168.107		178.775		188.533	
	Netto	93.878	66	96.768	65	111.009	66	127.525	71	133.767	71
Bygdaleiðir	Inntøkur	-17.474	38	-17.487	37	-18.163	36	-11.779	23	-13.440	23
	Útreiðslur	45.847		47.772		50.673		50.367		58.157	
	Netto	28.373	62	30.285	63	32.510	64	38.588	77	44.717	77
Farstøðir og avgreiðslur	Inntøkur	-2.093	15	-2.010	15	-2.030	16	-1.689	11	-1.464	12
	Útreiðslur	14.036		13.418		12.873		14.717		12.361	
	Netto	11.943	85	11.408	85	10.843	84	13.028	89	10.897	88
Fyrisiting	Inntøkur	-83	1	-87	1	-108	1	-92	1	0	0
	Útreiðslur	13.641		13.005		13.913		14.223		12.852	
	Netto	13.558	99	12.918	99	13.805	99	14.131	99	12.852	100
Tilsamans	**Inntøkur**	**-68.039**	**32**	**-72.817**	**32**	**-77.399**	**32**	**-64.810**	**25**	**-69.670**	**26**
	Útreiðslur	**215.791**		**224.196**		**245.566**		**258.082**		**271.903**	
	Netto	**147.752**	**68**	**151.379**	**68**	**168.167**	**68**	**193.272**	**75**	**202.233**	**74**

Talva 12	**Ferja**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**	**2021já**
Løgujáttan	Sandoyarskip	316		3.529	5.165	
	Suðuroyarskip	23.129	3.506	29.520		7.000
	Eykabátur			23.728	11.947	
	Netto	**23.445**	**3.506**	**56.777**	**17.112**	**7.000**

frá einari privatari fyritøku. Bygdaleiðir eru útveittar við sjey ára bruttosáttmálum. Mestsum allar útreiðslurnar har eru gjald sambært sáttmálum. Strandferðslan fær inntøkurnar frá Bygdaleiðum.

Nýíløgur í ferjur o.a. og størri viðlíkahald verða játtað fyri seg við løgujáttanum. Í 2021 er løgujáttan uppá sjey mió. kr. til at umvæla Smyril fyri, sí talvu 12.

Á mynd 13 sæst gongdin í rakstri, løgum og inntøkum hjá Strandferðsluni árini 2000-2021, umframt samanteljingin av tølunum (nettokostnaðurin). Nettokostnaðurin av stovninum er ávirkaður av skiftandi rakstri og løgum, sum verða gjørdar í nýggjar ferjur o.til., men eisini av teimum íløgum, sum annars eru gjørdar í samferðslukervið. Síðani 2000 hava samlaðu nettoútreiðslurnar av rakstri og løgum ligið millum 82 og 225 mió. kr. Sum sæst, eru færri løgur gjørdar síðstu árini í mun til árini eftir aldarskiftið.

Inntøkurnar vóru um aldarskiftið út við 60% av rakstrarútreiðslunum. Síðani minkaðu tær av undirsjóvartunlum, sum vórðu gjørdir og opnaðu í 2002 og 2006, og av Farmaleiðum, sum vórðu seldar í 2006. Ferðaseðlaprísirnir vórðu eisini settir niður um somu tíð. Tey síðstu nógvu árini hava inntøkurnar ligið um tey 30% av útreiðslunum, tó 25% seinastu tvey árini.

Strandferðslan hevur mett, at inntøkurnar frá farmi eru í nøkunlunda sama lutfalli, sum aðrar inntøkur eru í mun til rakstrarútreiðslurnar, t.e. um ein triðing. Hasfjord varð settur í sigling á sumri 2020 at føra farm á Sandoyarleiðini. Roknskapurin fyri skipið sæst í talvu 14.

Strandferðslan hevur greitt frá, at prísirnar vóru lækk-

Mynd 13 **Rakstur, løgur, inntøkur og nettokostnaður**



Talva 14		2019	%	2020	%	2021	%	Tilsamans	%
Hasfjord	Inntøkur		0	-1.762	40	-1.312	20	-3.074	28
	Útreiðslur			4.442		6.560		11.002	
	Nettorakstur		0	2.680	60	5.248	80	7.928	72
	Løgur	3.529		5.166		0		8.695	
	Tilsamans	**3.529**		**7.846**		**5.248**		**16.623**	

aðir, stutt eftir at Hasfjord fór undir siglingina, og at inntøkurnar annars eru skiftandi, serliga frá einari alifyritøku. Í 2022 verður roknað við hægri inntøkum.

Á mynd 15 eru rakstur og løgur býtt sundur í:

- Lønir (grønt)
- Olju, sáttmálar og annan rakstur (blátt)
- Viðlíkahald og løgur (appelsingult)

Av rakstrarútreiðslunum hjá Strandferðsluni eru um 35% lønarútreiðslur. Strandferðslan hevur síðani 2002 veitt allar bussleiðir út. Á myndini eru sáttmálagjøldini partur av øðrum rakstri áðrenn 2008. Lønir til bussførarar eru partur av sáttmálagjaldinum. Lønirnar hjá Strandferðsluni eru nakað minni av tí orsøk.

Aðrar útreiðslur kunnu vera skiftandi, serliga olja og viðlíkahald, sum sæst í myndini. Tað ger tað torført at stýra í mun til játtanina, at gera neyðugar tillagingar og at broyta raðfestingar í rakstrinum so hvørt. Strandferðslan fær eisini eykajáttanir tey flestu árini.

Nýíløgur í ferjur o.a. og størri viðlíkahald verða játtað í løgujáttan og raðfest saman við øðrum løgum hjá landi-

Mynd 15 **Útreiðslubýti**



Rakstrarútreiðslurnar eru ymiskar frá ári til ár, t.d. hava útreiðslurnar til olju ligið millum 21 og 55 mió. kr. um árið síðani 2005, tá ið nýggi Smyril kom og økti fitt um oljunýtsluna. Viðlíkahaldið er eisini ymiskt, m.a. vegna dokking, men tað kunnu eisini vera óvæntaðar útreiðslur.

num. Seinastu árini hevur politiski myndugleikin ikki raðfest ferjur frammarliga. Flotin hevur tí ein høgan miðalaldur. Ferjurnar hava eisini nógvar fráferðir stórtsæð hvønn dag í árinum. Hesi viðurskifti hava við sær, at útreiðslurnar av ferjunum, bæði viðlíkahald og aðrar útreiðslur, eru høgar, sí part 5.2.2 um samanbering av gomlum og nýggjum ferjum.

Sambært Strandferðsluni hevur viðlíkahaldið av ferjunum á rakstrarjáttanini og løgujáttanini verið út við 200 mió. kr. árini 2013-2020, t.e. 24-25 mió. kr. í miðal um árið. Útreiðslurnar eru ymiskar hvørt árið. Í 2017 og 2019 var Smyril í dokk, og var samlaða viðlíkahaldið tá ávikavist 34 og 52 mió. kr. Hini árini hava útreiðslurnar verið 16-23 mió. kr. Í 2021 verður viðlíkahaldið væntandi 48 mió. kr.

3.5. Samanumtøka

Umstøðurnar hjá Strandferðsluni broytast alsamt yvir tíð. Samferðslukervið verður bygt út, og krøv um tænastu, skjótleika, høgleika, smidleika o.a. herðast.

Strandferðslan rekur í dag níggju sjóvegis farleiðir og hevur 24 landvegis farleiðir, sum eru útveittar sambært fleiriára sáttmálum við privatar fyritøkur. Á Oyggjaleiðum eru árliga eini 700 tús. ferðandi og 170-175 tús. akfør, og á Bygdaleiðum eini 500 tús. ferðandi. Gongdin er, at støðugt fleiri ferðandi og akfør eru við Oyggjaleiðum, men færri við Bygdaleiðum. Farmur er fyrst og fremst á Suðuroyar- og Sandoyarleiðunum, og har kunnu til tíðir vera avbjóðingar. Oyggjaleiðir hava umleið 500 fráferðir um vikuna; Bygdaleiðir umleið 1.500 fráferðir.

Rakstur og løgur hjá Strandferðsluni eru skiftandi sum hjá fyritøku, sum fæst við skiparakstur o.til. Síðani 2000 hava samlaðu nettoútreiðslurnar ligið millum 82 og 225 mió. kr. Tað ger tað torført at stýra í mun til játtanina, at gera neyðugar tillagingar og at broyta raðfestingar í rakstrinum so hvørt. Stovnurin fær eisini eykajáttanir mestsum á hvørjum ári.

Ferjurnar hjá Strandferðsluni sigla stórtsæð hvønn dag á tamb, tað veri seg alt frá fullfermdar til, at heilt fá ferðandi er við. Ferjurnar hava ein høga miðalaldur. Nýíløgur í ferjur o.a. eru ikki raðfestar frammarliga av politiska myndugleikanum seinastu árini. Hesi viðurskifti hava við sær høgar útreiðslur av ferjunum, bæði viðlíkahald og aðrar útreiðslur.

GARMIN
14M

Flutningsskylda og virksemi hjá Strandferðsluni

4. Flutningsskylda og virksemi hjá Strandferðsluni

Virksemið hjá Strandferðsluni er fevnt av flutningsskyldu, sum er ásett í lóg um fólka- og farmaflutning. Sum greitt frá í parti 3, fær stovnurin einar 200 mió. kr. um árið til rakstur, umframt løgujáttan til ferjur, størri viðlíkahald o. tíl. Politiski myndugleikin hevur tí væl skilligt stóran áhuga í virkseminum hjá stovninum, og hvussu samferðslan annars er skipað. Partur av virkseminum hjá Strandferðsluni er bundin í fleiri ára sáttmálar við privatar fyritøkur. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Og vit kunnu leggja afturat útbyggingar í samferðslukervið, sum ávirka samferðsluna.

Tað eru soleiðis fleiri viðurskifti, sum hava ein týðandi leiklut í at mynda tað virksemi, sum Strandferðslan skal útinna. Av somu orsøk kann tað vera ein avbjóðing fyri stovnin at vita neyvt, hvørja tænastu hann skal veita, og ikki minst kann tað vera ein avbjóðing fyri stovnin at leggja samlaða virksemið til rættis nøkur ár fram.

Viðurskiftini við politiska myndugleikan hava sera stóran týdning, men tað er viðkomandi at spyrja, um tað ber til at skipa politiskar væntanir o.a. betur í hóskandi og fastari karmar, so tað kann vera greiðari og støðugari, hvørja tænastu Strandferðslan skal veita og til hvønn.

Á næstu síðunum verður tí hugt at flutningsskylduni, hvat hon eigur at fevna um, og hvussu tað er frægast at skipa samferðsluvirksemið sambært flutningsskylduni.

4.1. Reglur og krøv um virksemi

Virksemið hjá Strandferðsluni er sambært løgtingslóg nr. 82 frá 15. mai 2001 um fólka- og farmaflutning, seinast broytt í 2019. Sambært § 2, stk. 1 hevur landið skyldu til at skipa fyri:

1. Nøktandi sjóvegis fólkaflutningi, farmaflutningi og/ella flutningi av akførum
2. Nøktandi landvegis fólkaflutningi, á teimum farleiðum, har tað hevur stóran samfelagsligan týdning, at skipað verður fyri slíkum flutningi

Í stk. 2 er flutningsskyldan ásett at fevna um sjóvegis farleiðirnar millum:

- Tvøroyri - Tórshavn
- Skúvoy - Sand
- Skopun - Gamlarætt, Skopun - Hest, Hest - Gamlarætt
- Nólsoy - Tórshavn
- Sørvág - Mykines
- Klaksvík - Kalsoy
- Hvannasund - Fugloy, Hvannasund - Svínoy
- Sjó- og landvegis farleiðir, ið landsstýrismaðurin í kunngerð ásetir flutningsskyldu fyri

Eingin kunngerð er um aðrar farleiðir. Landið rekur flutningin, sum kemur undir § 2, tó kann landsstýrismaðurin bjóða raksturin út í upp til sjey ár í senn, § 4. Tað er ein treyt fyri at bjóða tær flestu av sjóvegis farleiðunum út, at tað er til fyrimuns fyri farleiðirnar fíggjarliga og tænastuliga, t.d. at túratalið ikki lækkar, og at miðal ferðaseðlaprísurin ikki hækkar.

Í 2006 vórðu Farmaleiðir einskildar frá Strandferðsluni. Stovnurin hevur nú bara skyldu til sjóvegis flutning av farmi, men flytir eisini farm landvegis, har vinnugrundarlagið er ivasamt.

Ein reglugerð frá 30. juli 2015 er fyri Strandferðsluna. Sambært § 1, stk. 2 ásetir landsstýrið reglur um virksemið. Stovnurin (fyritøkan) skal lúka landsins tørv á fólka- og farmaflutningi innanlands, § 2, og skal í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði, § 3.

Flutningsskyldan, sum er sambært lógini um fólka- og farmaflutning, er yvirskipað. Hvør er fevndur, tænastustig, ferðaætlan og prísskipan eru ikki ásett neyvari í lógini ella aðrastaðni. Tað er heldur ikki nøkur føst mannagongd um, hvussu tey viðurskiftini verða góðkend. Men ferðaætlan, prísskipan o.a. eru samanumtikið sambært játtan og undirtøku frá politiska myndugleikanum. Stovnurin ger ikki stórvegis broytingar á farleiðum og í prísum, uttan at landsstýrismaðurin tekur undir við tí. Tað kemur eisini fyri, at Løgtingið ynskir broytingar, t.d. við at hækka játtanina til at lækka prísir ella til onkra eykatúrar.

Í veruleikanum hava tann yvirskipaða flutningsskyldan, fyriskipanin við játtanum fyri eitt ár í senn og tað – at politiska skipanin sjónligt hevur ymisk ynskir í sambandi við fíggjarlógina og á annan hátt – við sær, at politiski myndugleikin í stóran mun hevur tikið á seg ábyrgdina av støðugt at stýra og nágreina, hvat Strandferðslan skal og ikki skal. Tað er tí ein avbjóðing fyri stovnin at leggja virksemið til rættis og at gera av, hvussu játtanin skal brúkast skilabest.

4.2. Hvat fevnir flutningsskyldan um

Flutningsskyldan hevur avgerandi týdning fyri virksemið hjá Strandferðsluni. Fyri at gera av, hvat flutningsskyldan skal fevna um, ber til at hyggja at, hvørji samfelagslig atlit hon eigur at byggja á, og hvussu virksemið kann skipast samsvarandi.

Strandferðslan kann sigast at vera ein partur av samferðslukervinum í Føroyum, har serliga sjóvegis farleiðirnar virka sum vegir út til oyggjarnar og inn á "fastlandið". Tað hevur so við sær, at allir borgarar í mest møguligan mun kunnu vera partur av samfelagnum og kunnu brúka almennar tænastur o.a., hóast teir búgva ymsastaðni í landinum. Á tann hátt fæst størri gagn av teimum tilboðum, sum eru í samfelagnum, tað javnsetir borgararnar í landinum, og tað minkar um tørvin á at byggja upp dupultfunktiónir. Samstundis er ein støðug og trygg farleið ein fyritreyt fyri trivnaði kring alt landið. Arbeiðsbólkurin heldur tí, at tað gevur góða meining, at landið tryggjar ein bíligan og støðugan flutning, soleiðis at borgarar dagliga kunnu ferðast aftur og fram til at klára síni ørindi[4].

Góð samferðsla hevur møguleikar við sær fyri ferðavinnu kring landið, og ferðavinnan fer væntandi at fylla alsamt meira í samferðsluni í Føroyum. Tó má haldast, at slík ferðing ikki er beinleiðis fevnd av lógarfestu flutningsskylduni, men eigur at verða skipað á handilsligum støði. At virksemið er skipað á handilsligum støði inniber, at inntøkurnar frá tí virkseminum í størri mun dekka kostnaðin av tí virkseminum. Landið eigur sostatt ikki at átaka sær tær lutfalsligu útreiðslurnar av flutninginum, sum eru av ferðavinnu og stuttleikaferðing.

Prísskipanin hjá Strandferðsluni má soleiðis kunna skilja ímillum tey ferðandi, soleiðis at ferðafólk og fyri so vítt onnur fólk, sum sjáldan ferðast á leiðunum hjá Strandferðsluni, í miðal rinda meira fyri hvørja ferð enn tey, sum regluliga ferðast, t.v.s. ein atferðarstýrda avsláttrarskipan. Í spurninginum um, hvørt fólk, sum búgva á útoyggjum, sum heild skulu rinda ein lægri prís enn onnur fólk, heldur arbeiðsbólkurin, at tað er upp til kommunur, landið o.o. at gera av, um tey vilja veita stuðul til tað og í hvønn mun, t.d. ávíst tal av ferðum.

Strandferðslan førir farm á leiðunum, men prísurin, sum brúkarin rindar, svarar ikki til tann lutfalsliga kostnaðin, sum Strandferðslan hevur av at flyta farmin. Ein partur av játtanini til stovnin fer sostatt til bíligan farmaflutning. Dømini eru raksturin av Hasfjord og prísirnir fyri sleip á Suðuroyarleiðini, sum eru langt undir kostprís. Ein ov lágur prísur til farm og vinnu kann skeikla vinnubygnaðin og byggja upp vinnu, sum ikki er burðardygg.

Virksemið, sum Strandferðslan hevur av vinnu og farmi, eigur sum meginregla at verða rikið á handilsligum støði, soleiðis at vinnan rindar tað, sum flutningurin kostar Strandferðsluni. Tað, at vinnan í størri mun ber kostnaðin, ger, at Strandsferðslan betur kann veita tænastur, sum eftirspurningur er eftir, og kann hava neyðugan kapasitet til vinnuliga tørvin.

Er politiskt ynski um t.d. at stuðla vinnu á útoyggj, eigur tað at verða játtað á serstakari kontu, sum tað ber til at søkja um stuðul frá. Tað gevur eina betri mynd av veruliga kostnaðinum, og Strandferðslan verður hildin "skaðaleys", um eftirspurningurin eftir vinnu- og farmaflutningi brádliga broytist.

Flutningur, sum er fevndur av lógini um fólka- og farmaflutning, er vinnuligur og skal skiljast sum reglubundin flutningur móti gjaldi við akfari ella skipi, og er ætlaður almenninginum. Hesin flutningurin skal vera nøktandi. Tað er fyrst og fremst við játtan í fíggjarlógini, at tað verður umsett til veruleika. Sum greitt frá í parti 3, er flutningstænastan ymiskt á hvørji farleið, t.d. bilferja ella ikki, aldur á ferju, sigla alt árið ella ikki, tilkallitúrar, fráferðatíttleiki, hvussu nógv ferðafólk kunnu vera við, og umstøður til ferðafólk.

Arbeiðsbólkurin heldur, at kravið um nøktandi reglubundan flutning inniber, at politiski myndugleikin ítøkiligt, og ikki skiftandi til hvørja fíggjarlóg ella eykajáttan, tekur støðu til tey týðandi viðurskifti, sum tilsamans svara til ein tílíkan flutning. Politiski myndugleikin má gera av, hvørja tænastu, Strandferðslan skal veita, t.d. ferjur, umstøður til ferðandi, akfør o.tíl., prísskipan og ferðaætlan. Tað snýr seg soleiðis bæði um rakstur og íløgur.

[4] Á fundi, sum arbeiðsbólkurin hevði við Olgu Biskopstø, samskipara í Útoyggjafelagnum, varð orðingin "at pendla við lættleika" brúkt. Tað er í grundini óguvliga beinraki.

4.3. Tænastusáttmáli

Flutningsskyldan er tilverugrundarlagið hjá Strandferðsluni. Sum umrøtt omanfyri, er tað neyðugt at tulka skylduna við at áseta neyvari krøv og skyldur. Hvat inniber flutningsskyldan ítøkiligt, tá ið tað ræður um tænastustig, fráferðir, prísir o.a.?

Landið brúkar árliga nógvar pengar uppá Strandferðsluna, og tískil er eisini stórur politiskur áhugi í at gera av og ávirka, hvat skal fáast fyri pengarnar. Tað er uppgávan hjá politiska myndugleikanum at hava eina meining um, hvussu samferðslan skal skipast, og hvussu pengarnir skulu brúkast. Trupuleikin í dag er, at politiska ávirkanin støðugt er til staðar og kann vera skiftandi uttan mun til, hvat ber til rakstrarliga. Tað er tað, sum ger tað trupult hjá Strandferðsluni at leggja virksemið til rættis.

Sum eisini greitt frá í eldri frágreiðingum um Strandferðsluna, hevur samferðsluøkið í okkara grannalondum verið fyri stórum broytingum. Aðalmálið hevur verið at skilja sundur politiska myndugleikan og sjálvan raksturin. Ætlanin hevur ikki verið at minka um politisku krøvini, men heldur at seta krøvini fram á ein øðrvísi og meira skipaðan hátt enn frammanundan. Tað er soleiðis vanligt hjá grannalondunum, at samferðslan er skipað við sáttmálum. Tað gevur bæði politiska myndugleikanum, sum er keypara, og veitaranum betri vissu fyri, hvat er galdandi nú og frameftir. Veitarin fær tí lagað rakstur og løgur til sáttmálan.

Arbeiðsbólkurin heldur, at krøvini hjá politiska myndugleikanum eiga at verða ásett í einum tænastusáttmála millum landið og Strandferðsluna. Krøvini í sáttmálanum svara til eina upphædd, sum landskassin rindar til Strandferðsluna at útinna virksemið fyri, tað veri seg stuðul ella keyp av einari tænastu. Sáttmálin eigur at vera tíðaravmarkaður fyri nøkur ár og skal hava ítøkligar ásetingar um tænastu, farleiðir, ferðaætlan og prísskipan. Eisini eiga krøv um veitingartrygd, møgulig eykaskip og tilbúgving annars at vera partur av sáttmálanum.

Ein fyriskipan við tænastusáttmála ger flutningsskylduna og -tænastuna ítøkiligari og gjøgnumskygdari, og politisku ynskini um samferðslu og broytingar í henni verða betur skipað í fastar karmar. Tankin er, at sáttmálarnir, sum frá líður, skulu vara 8-10 ár, soleiðis at tað ber til hjá Strandferðsluni at leggja virksemið til rættis og gera tær íløgur, sum eru skynsamar og neyðugar. Sáttmálarnir eiga at verða gjørdir minst tvey ár áðrenn gildiskomu.

Í tænastusáttmálanum við Strandferðsluna kunnu eisini vera ásetingar um viðurskifti, sum kunnu broytast í sáttmálatíðarskeiðnum, t.d. prístalsviðgerð, broytingar í oljuprísi, og um møguligar meirtænastur. Hóast krøvini um tænastu o.a. eru nágreinað í sáttmálanum fyri fleiri ár, ber eisini til hjá politiska myndugleikanum eftir skipaðum leisti at gera broytingar við ískoytissáttmála. Er politiskt ynski um broytt túratal, lægri prísir ella onkrar umraðfestingar í samferðsluni, eigur tað at vera møguligt at gera ískoyti til tann galdandi sáttmálan. Tað, sum hevur týdning, er, at Strandferðslan veit, hvat hon hevur at halda seg til, og at framtíðar broytingar vera gjørdar í sáttmála millum politiska myndugleikan og Strandferðsluna.

Ein annar fyrimunur við at skipa virksemið hjá Strandferðsluni við sáttmála er, at tá er lættari hjá kommunum og øðrum at leggja afturat virkseminum. Stóru kommununurnar fevna um fleiri bygdir og oyggjar, so tær hava ein sjálvsagdan áhuga í samferðsluni í kommununi. Í dag rindar t.d. Klaksvíkar kommuna fyri túrar í Kalsoynni, men samlað sæð eru kommununurnar varnar at rinda fyri nakað, sum landið møguliga kann taka sær av. Við sáttmálum, sum greitt áseta vavið av krøvunum um tænastu, leggur landið eitt minstamark, og kommunur, sum kenna staðbundna tørvin, kunnu so keypa meira ferðslu eftir tørvi.

Tað eru ymiskir mátar at skipa samferðsluna við sáttmálum. Danskir myndugleikar hava greitt frá, at sáttmálar verða bodnir alment út. Mestsum allir ferju- og busssáttmálarnir eru við privatar veitarar, t.d. Molslinjen, sum eisini eigur skipini. Serlig atlit galda smærri oyggjar, t.d. hava kommununurnar á Fanø, Samsø og Ærø ábyrgdina av almennu bussleiðunum.

Íslendskir myndugleikar hava skipað tað øðrvísi, t.d. eigur landið tríggjar av fimm ferjum, har feløg reka farleiðirnar sambært sáttmála við landið, men afturfyri eru sáttmálatíðarskeiðini trý til fimm ár. Á farleiðini til Vestmannaoyggjarnar er sáttmáli við felag hjá kommununi.

Tað, at landið eigur ferjurnar, men at raksturin er útveittur, verður eisini brúkt í Álandi, tó ber landið útreiðslurnar til viðlíkahald og olju. Endamálið er at hava so góð-

ar sáttmálatreytir, sum til ber, fyri at tryggja veruliga kapping og harvið lágan kostnað fyri tænastuna.

Í Grønlandi eru sáttmálar við bæði almenn og privat partafeløg. Sum skilt, verður boðið út, men stórvegis kapping er ikki. Áður er roynt at bjóða bæði ferju- og tyrlusáttmálar út í altjóða kapping í vón um at fáa lægri prísir. Tílík útboð eru kravmikil, og tí hevði løgfrøðiliga arbeiðið við sær stórar útreiðslur. Úrslitið varð, at tað var bert ein veitari, sum var førur fyri at geva eitt tilboð, og tí spurdist ikki nøkur verulig kapping burturúr.

Er ætlanin at gera sáttmála við Strandferðsluna, gevur tað ikki meining at bjóða út, men heldur at samráðast við Strandferðsluna um sáttmálan. Hvørt tænastur ella farleiðir eiga at verða bodnar út, er ein annar spurningur. Tey viðurskiftini eru gjølla greinað í frágreiðing frá arbeiðsbólki, sum viðgjørdi útveiting í 2015. Yvirskipað sæð, má tað haldast at vera skilabest at gera ein sáttmála beinleiðis við Strandferðsluna fyri at gagnnýta stórrakstrarfyrimunir við at samskipa raksturin. Spurningurin, um Strandferðslan skal bjóða tænastur ella farleiðir út, er ein partur av tilrættaleggingini hjá Strandferðsluni, hvat er mest skynsamt og ódýrast.

4.4. Samferðslufyrisiting

Tað er umráðandi, at landið leggur neyðuga orku í at gera sáttmála við Strandferðsluna, ískoyti um broytingar til sáttmálan, og at hava eftirlit við sáttmálanum. Fyrisitingin eigur at hava nøktandi orku og fakligar førleikar innan sáttmálastýring, skiparakstur o.tíl.

Í øðrum frágreiðingum hevur verið víst á týdningin av einari "samferðslueind", sum skal hava um hendi yvirskipaða samferðslustýring og eftirlit. Tað er umráðandi, at neyðug orka verður løgd í eindina. Um eindin skal vera partur av einum verandi stovni, ein eind í landsstýrinum ella okkurt triðja, dugir fyrisitingin hjá landsstýrinum best at meta um sjálv. Mett verður, at eindin svarar til eitt til tvey starvsfólk í fyrisitingini hjá landinum.

Í dag er samferðslueindin partvíst til staðar í Strandferðsluni, sum leggur ætlanir fyri samferðsluna. Eindin røkir t.d. eisini sáttmálarnar við bussveitararnar og felagið, sum røkir Mykinesleiðina. Tankin er, at Strandferðslan frameftir í størri mun skal virka sum veitari, men at yvirskipaða tilrættaleggjanin skal vera hjá samferðlueindini hjá landinum.

Í sáttmálanum við Strandferðsluna eiga at vera krøv um regluligar rapporteringar um m.a. reglusemi á farleiðunum og hagtøl um ferðafólk, bilar og farm, og skulu tær vísa, hvussu Strandferðslan livir upp til sáttmálan. Krøv eiga at vera um regluligar brúkarakanningar, sum kunnu vera við til at lýsa tænastustigið hjá Strandferðsluni. Tílíkar upplýsingar eru eisini hentar hjá myndugleikunum í arbeiðinum at leggja ætlanir fyri samferðsluna og samferðslukervið frameftir.

4.5. Samanumtøka

Strandferðslan hevur eina sjóvegis og ávísa landvegis flutningsskyldu sambært lóg um fólka- og farmaflutning. Skyldan er yvirskipað, og tað er ikki nakað neyvari ásett um, hvør er fevndur, tænastustig, ferðaætlan, prísskipan o.a. Strandferðslan fær játtan fyri eitt ár í senn, og politiskar væntanir og krøv til Strandferðsluna kunnu vera ymisk og vera ógreið. Í stóran mun hevur politiski myndugleikin tikið ábyrgdina á seg støðugt at stýra og nágreina, hvat Strandferðslan skal og ikki skal. Í reglugerð fyri Strandferðsluna er ásett, at stovnurin í størstan mun skal rekast á handilsligum støði. Tað er tí ein avbjóðing fyri stovnin at leggja virksemið til rættis og at gera av, hvussu játtanin skal brúkast skilabest.

Flutningsskyldan snýr seg um, at landið tryggjar ein bíligan og støðugan flutning, soleiðis at borgarar dagliga kunnu ferðast aftur og fram til at klára síni ørindi, men at virksemið av ferðavinnu og farmi sum meginregla eigur at verða rikið á handilsligum støði. Prísskipanin hjá Strandferðsluni má tí vera atferðarstýrd, soleiðis at tey, sum sjáldan ferðast á leiðunum hjá Strandferðsluni, rinda hægri prís enn tey, sum regluliga ferðast. Kravið um nøktandi reglubundnan flutning inniber, at politiski myndugleikin ítøkiliga tekur støðu til tey týðandi viðurskifti, sum tilsamans svara til ein tílíkan flutning.

Arbeiðsbólkurin heldur, at krøvini frá politiska myndugleikanum eiga at verða ásett í einum tænastusáttmála millum landið og Strandferðsluna. Sáttmálin skal vera fyri nøkur ár og skal hava ítøkiligar ásetingar um tænastur, farleiðir, ferðaætlan og prísskipan. Eisini eiga krøv um veitingartrygd, møgulig eykaskip og tilbúgving annars at vera ein partur av sáttmálanum.

Ein fyriskipan við tænastusáttmála ger flutningsskylduna og -tænastuna ítøkiligari og gjøgnumskygdari, og politisku ynskini um samferðslu og broytingar í henni verða betur skipað í fastar karmar. Strandferðslan fær betur lagt virksemið til rættis og gjørt skynsamar og neyðugar íløgur. Við sáttmálanum leggur landið eitt minstamark, og tað ber lættliga til hjá landið, kommunum og øðrum at leggja afturat við ískoytissáttmálum.

Tað er umráðandi, at landið leggur neyðuga orku í, t.d. við at skipa eina samferðslueind, at gera sáttmála við Strandferðsluna, ískoyti um broytingar til sáttmálan og at hava eftirlit við sáttmálanum, umframt at gera yvirskipaðar samferðsluætlanir.

Í sáttmálanum eiga at vera krøv um regluligar rapportering um reglusemi, ferðafólkatal o.a. Tílíkar upplýsingar verða brúktar til eftirlit, men kunnu eisini brúkast til samferðsluætlanir.

Skipanarlig viðurskifti *hjá Strandferðsluni*

4,90m
S.W.L.
53 tons
SUÐUROYARLEIÐIN
SCANIA
SCANIA

5.
Skipanarlig viðurskifti hjá Strandferðsluni

Í parti 3 og 4 er greitt frá virkseminum hjá Strandferðsluni, og hvussu politisku ynskini kunnu skipast við tænastusáttmála. Í hesum parti verður kannað, um Strandferðslan er skipað rætt í mun til uppgávurnar, og um hon hevur tey røttu amboðini at laga seg til umstøðurnar bæði nú og í komandi árum. Stuðlar bygnaðurin einum skynsamum rakstri?

Fyri at svara spurninginum er neyðugt at fáa greiðu á, hvørjar skipanarligar avbjóðingar Strandferðslan hevur sum almennur stovnur. Síðani er spurningurin, í hvønn mun tað ber til at loysa avbjóðingarnar – antin við at Strandferðslan verður verandi almennur stovnur, ella at Strandferðslan verður løgd í eina sjálvstøðugari eind.

Til at stuðla undir svarið verður hugt at, hvat endamálið er við almennum stovnum, og hvørji eyðkenni teir hava. Mett verður í hvønn mun, tað svarar til Strandferðsluna og tær uppgávur, sum hon skal røkja.

5.1. Um alment virksemi

Alment virksemi hevur heimild í stýrisskipanarlógini og í teimum lógum, Løgtingið samtykkir. Landsstýrið hevur endaligu fyrisitingarligu ábyrgdina[5] og útinnir virksemið hjá landinum. Fyrst og fremst er virksemið skipað í almennar stovnar, ráð o.tíl. við játtan til ávíst virksemi.

Landið hevur tó eisini fyriskipað stovnum, sum ikki eru við í fíggjarlógini og/ella hava eitt leysari tilknýti til fyriskipanina hjá landsfyrisitingini. Harumframt hevur landið einsamalt ella saman við øðrum stovnað ella yvirtikið partafeløg og aðrar fyritøkur. Nøkur dømi eru Atlantic Airways, Smyril-Line, Norðoyatunnilin, Føroya Tele og Realurin.

Tað er í fleiri førum eyðsæð, hvussu alment virksemi mest hóskandi eigur at verða skipað. Men tað ber ikki eintýtt til at siga, at landið skipar sítt virksemi ella luttekur í almennum vinnuligum ella øðrum virksemi eftir føstum leisti. Í so máta er tað eisini eitt sindur ymiskt yvir tíð, hvussu svarini hava verið uppá spurningar um, hvørjar uppgávur ligga á landinum at taka sær av, hvønn leiklut landið skal hava, og hvussu leikluturin skal skipast.

Hugsa vit alment á aðrari síðuni og privat á hinari, ber til at lýsa nøkur eyðkenni, sum eru við almennum virksemi í mun til privat virksemi. Sum við dømunum omanfyri ber ikki heilt til at siga, at tað almenna ikki eigur ella luttekur í virksemi, sum eisini verður ella kann verða rikið av privatum. Tað kann tó sigast, at tað vanliga altíð er eitt samfelagslig og kanska søguligt atlit at finna sum orsøk fyri, hví landið t.d. eigur eina fyritøku sum Atlantic Airways ella Føroya Tele. Samstundis er kanska ikki torført at hugsa sær, hví tær fyritøkurnar í hesum førum eru partafeløg og ikki almennir stovnar.

Fremsta eyðkennið við almennum virksemi er, at tað er bara tað almenna, sum útinnir tað virksemið. Tað er alment kjarnuvirksemi. Tað almenna kann hava einkarætt. Tað snýr seg um myndugleikar sum Løgtingið, dómsvaldið, løgregluna ella stovnar, sum taka avgerðir um t.d. at veita persóni fólkapensjón. Avgerðir hjá stovnum sum Almannaverkið skulu lúka fyrisitingarligar treytir, eitt nú vera sakligar og upplýstar. Persónurin hevur rætt til at verða hoyrdur, og hann kann kæra. Tað snýr seg um rættartrygd, rætta avgerð o.s.fr.

Tað almenna hevur eisini virksemi, har meginuppgávan ikki er at taka fyrisitingarligar avgerðir, men tá eru ofta týðandi almennar og samfelagsligar orsøkir til, hvussu virksemið er skipað, t.d. sjúkrahús, skúlar ella sentralir stovnar sum Gjaldstovan og Landsverk. Almennar reglur kunnu vera um virksemið, t.d. fyri viðgerðarstovnar, men tað kemur meira enn so fyri, at stovnarnir eru privatir, men fáa almenna játtan út frá ávísum treytum.

Í flestu førum rindar landið fyri virksemið við inntøkum frá skatti og avgjøldum. Onkrar skipanir eru fíggjaðar við kravdum gjøldum, t.d. eftirlit við tryggingarfyritøkum. Fíggingin av almennum virksemi er tí vanliga ikki sjálvboðin, sjálvt um veitingin, sum stendur í boði, kann vera sjálvboðin, t.d. barsilspeningur. Í nøkrum førum kann ein partur av virkseminum verða fíggjaður av gjøldum, t.d. fyri ávísar tænastur á bókasøvnum. Vinnuligt virksemi – tá ið vørur, tænastur o.a. verða latin øðrum, sum sjálvboðin keypa og rinda fyri – er í onkrum førum lagt í almennar stovnar (landsfyritøkur), t.d. Rúsdrekkasølan og Apoteksverkið.

Onnur viðurskifti kunnu takast fram, t.d. lønarvið-

[5] Føroya landsstýri: "Álit um stýrisskipanarviðurskifti Føroya", 1994, s. 175.

urskifti, roknskaparlig viðurskifti, ella at landsstýrismaðurin kann geva stovninum boð, sí talvu 18.

Samanumtikið ber til at siga, at um eitt virksemi í stóran mun kemur undir tey eyðkenni, sum eru umrødd omanfyri, talar tað fyri, at ein almennur stovnur útinnir virksemið:

1. Virksemið hevur beinleiðis lógarheimild (og einkarætt)
2. Virksemið hevur eitt alment endamál, t.d. ein myndugleiki
3. Virksemið inniber at taka fyrisitingarligar avgerðir
4. Virksemið snýr seg um týðandi almennar ella samfelagsligar uppgávur
5. Virksemið verður fíggjað av játtan í fíggjarlóg, undir hesum við kravdum gjøldum o.ø.
6. Virksemið er ikki vinnuligt (t.e. brúkarar umbiða og rinda fyri vørur, tænastur o.a.)
7. Privat útinna ikki tílíkt virksemi
8. Almennar reglur galda ella skulu galda fyri virksemið, t.d. um lønir og roknskap
9. Landsstýrismaðurin kann ella skal kunna geva tænastuboð um virksemið

Onnur viðurskifti kunnu eisini nevnast. Tað er eyðsæð, at hevur eitt virksemi ikki ella í sera lítlan mun eyðkennini, sum eru umrødd, er tað ikki vist, at besta loysnin er at skipa virksemið í ein vanligan almennan stovn. Tað kunnu tó, sum nevnt, vera orsøkir til, at landið stendur fyri ella luttekur í virkseminum, vinnuligt ella ikki. Tá ber til at umhugsa aðrar loysnir, t.d. ein stovn, sum er óheftur ella sjálvstøðugur, ella eitt alment partafelag.

Á mynd 16[6] síggjast nøkur sløg av virkiseindum, sum landið kann leggja virksemið í. Almennir stovnar eru fevndir av teimum vanligu reglunum hjá landinum, t.d. um fyrisiting og roknskap, og landsstýrismaðurin hevur víðar heimildir at áleggja stovnum boð ella fyriskipanir. Aðrir stovnar kunnu hava ávísar heimildir, t.d. hava inntøkufíggjað virksemi, ella vera óheftir. Ein óheftur stovnur útinnir virksemi, sum er óheft av politisku skipanini[7], og hevur vanliga eitt stýri, men er annars fevndur av vanligu reglunum, sum galda fyri almennar stovnar.

Sjálvstøðugir stovnar eru skipaðir við lóg, sum kann áseta, at fleiri av reglunum fyri almennar stovnar ikki skulu galda, teir hava stýri, og tað kann vera ásett, at "privatar" reglur skulu galda, t.d. um roknskap. Sjálvstøðugir stovnar verða ikki mettir at vera partur av vanligu almennu skipanini, men eru heldur ikki ein vanligur virkisformur sum t.d. partafeløg[8].

Sjálvstøðugir stovnar hava við lóg fingið delegerað fíggjarheimild, tí teir júst verða roknaðir at vera sjálvstøðugir og óheftir av landsstýrinum, og skulu gera sjálvstøðugan roknskap. Tó skal roknskapurin leggjast fyri Løgtingið eftir somu treytum sum fyri landsroknskapin[9].

Eitt partafelag er fevnt av privatrættarligum reglum, tó at tað ber til við lóg at hava serligar ásetingar um tað ávísa partafelagið.

Landsstýrismaðurin setir stjóran á einum almennum stovni[10]. Er stovnurin óheftur og hevur stýri, velur landsstýrismaðurin stýrið eftir ávísum leisti[11]. Stýrið setir stjóra at hava dagligu leiðsluna. Tað sama er galdandi fyri sjálvstøðugar stovnar[12]. Landsstýrismaðurin hevur tá ikki vanligar heimildir at leggja seg út í virksemið, tó at hann t.d. kann gera kunngerðir við heimild í lógini um stovnin ella viðkomandi virksemi.

5.2. *Avbjóðingar hjá Strandferðsluni sum almennur stovnur*

Strandferðslan kann sum almennur stovnur taka á seg skyldur og rættindi eftir tí ræðisrætti, sum landsstýrismaðurin hevur latið stovnsleiðaranum, men stovnurin er bundin av reglum, sum galda fyri alment virksemi, t.d. skal stovnurin halda játtanina, hann kann ikki hava avlop ella hall at flyta fram í roknskapinum, og hann kann ikki taka lán.

---

6 Endamálið við myndini er at lýsa, hvussu sjálvstøðugt virksemið er, og hvørjar týðandi reglur um virksemi, roknskap o.a. galda. Myndin skal takast við fyrivarni, t.d. eru sjálvsognarstovnar ofta privatir.

7 Sí t.d. løgtingslóg nr. 61/2006 um kringvarp um óheftni, men at stovnurin t.d. er partur av landsroknskapinum.

8 Finansministeriet o.o.: "Statslige aktieselskaber – tilsyn, ansvar og styring", 2003, s. 62-63, 245-252.

9 Fíggjarmálaráðið: "Álit um landsstovnar og -grunnar", 2001, s. 5-7.

10 Sí t.d. løgtingslóg nr. 104/1988 um apoteksverkið og annars álit frá 2006.

11 Sí t.d. løgtingslóg nr. 58/2009 um Fróðskaparsetur Føroya.

12 Sí t.d. løgtingslóg nr. 75/1998 um Realin (trý-mannastjórn, sum setir undirstjóra).

Mynd 16 **Ymiskar virkiseindir í mun til reglur og landsfyrisitingina**



Í mun til tey eyðkenni, sum eru nevnd í parti 5.1, ber til at siga, at Strandferðslan ikki kemur undir fleiri av teimum (1, 2, 3, 6 og 7). Tað má tó haldast, at virksemið snýr seg um týðandi samfelagsligar uppgávur (4). Virksemið verður partvíst fíggjað av játtan í fíggjarlógini (5). Almennar reglur galda (8), og landsstýrismaðurin kann geva tænastuboð (9) – so leingi sum stovnurin er vanligur almennur stovnur. Tað eru tó nøkur viðurskifti, sum kunnu tala fyri, at Strandferðslan verður óheftari, og at slakað verður í onkrum av almennu reglunum, t.d. ásetir reglugerðin fyri stovnin, at fyritøkan í størstan mun skal rekast á handilsligum støði.

5.2.1. Rakstrarjáttan og roknskapur

Sum umrøtt í parti 3.4 og eisini í eldri frágreiðingum um Strandferðsluna, so eru stór sveiggj í rakstrinum av serliga skiftandi oljuprísum og viðlíkahaldi. Tað hevur við sær avbjóðingar av at stýra í mun til játtanina fyri árið, at gera tillagingar og at broyta raðfestingar í rakstrinum so hvørt, fyri at játtanin skal halda. Leiðslan má fylgja nýtsluni fyri árið neyvt alla tíðina, og tað er ikki óhugsandi, at t.d. ymiskar ábøtur kunnu verða raðfestar aftarlaga ella ikki gjørdar.

Strandferðslan fær eykajáttan mestsum hvørt ár. Í 2021 vóru tvær eykajáttanir. Landsstýrið hevur tvey umfør í árinum fyri játtanir, sum hava tørv á meira ella minni peningi, og nýggjar játtanir. Aðrar eykajáttanir koma fyri. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggur umbøn um eykajáttanir fyri Løgtingið. Tær fáa tríggjar viðgerðir umframt nevndarviðgerð. Eykajáttanir taka fitt av tíð, áðrenn tær eru samtyktar. Annar møguleiki er fíggjarnevndarskjal, um mál hava skund, har Fíggjarnevndin kann játta eykajáttanarumbønini. Tað verður sjáldan gjørt.

Hava vit í huga, at raksturin hjá Strandferðsluni er skiftandi, at tørvur á umvælingum kann stinga seg upp alt árið, eisini seint uppá árið o.s.fr., og at stovnurin ikki kann flyta avlop ella hall yvir um fíggjarár, má fyriskipanin í játtanarskipanini við játtan og eykajáttanum sigast at gera tað óneyðuga torført fyri stovnin at stýra fíggjarliga raksturin hvørt árið.

Fyriskipanin við árligum játtanum er heldur ikki fremjandi fyri, at Strandferðslan kann leggja virksemi og løgur til rættis fyri nøkur ár fram. Leiðslan má fyrst og fremst tryggja, at tað einstaka fíggjarárið ikki víkir frá játtanini. Tað hevur so tann vansa við sær, at umstøðurnar fyri at arbeiða fyri at fáa ein betri og bíligari rakstur yvir tíð ikki eru tær bestu.

Samanumtikið eru avbjóðingarnar við reglunum um rakstrarjáttan og roknskap:

1. Strandferðslan kann, sum er, ikki flyta avlop ella hall til seinni fíggjarár
2. Stýringin í mun til játtanina fyllir nógv og tekur ov nógva leiðsluorku

3. Tillagingar og raðfestingar mugu gerast innan fíggjarárið, t.d. at útseta viðlíkahald
4. Sum vístá í parti 4, er trupult at gera tillagingar í ferðaætlan, prísskipan o.ø.
5. Frávík í mun til játtan mugu viðgerast við eykajáttan, sum tekur tíð

5.2.2. Løgujáttan og skynsamur rakstur

Nýíløgur í ferjur o.til. og størri viðlíkahald hjá Strandferðsluni verða játtað fyri seg í løgujáttan og raðfest saman við øðrum løgum hjá landinum. Løgurnar verða útreiðsluførdar í tí ári, tær verða framdar. Tað kann vera ein orsøk til, at flotin hevur ein høgan miðalaldur. Ferjurnar eru í rakstri stórtsæð hvønn dag í árinum. Í parti 3.3 er greitt nakað frá ferjunum.

Strandferðslan gjørdi í 2019 eitt uppskot til útskiftingarætlan fyri tær fýra ferjurnar, sum røkja farleiðirnar út í Nólsoy, Kalsoy, Svínoy, Fugloy og Skúvoy. Samlaða íløgan í ferjurnar varð mett at verða 300 mió. kr. Ein gjøgnumgongd av ferjurakstrinum vísti, at útreiðslurnar av verandi ferjum vórðu mettar at vera 32,8 mió. kr. um árið í mun til 23,5 mió. kr. av nýggju ferjunum, t.e. 9-10 mió. kr. á muni, tá ið inntøkur og íløgur ikki eru tiknar við. Við nýggju ferjunum verður minni av viðlíkahaldi, men orkunýtsla, lønir o.a. verða eisini minni.

Nýggjar ferjur verða bygdar eftir galdandi krøvum, og umstøðurnar til ferðafólk og manning eru meira tíðarhóskandi. Skulu ferjur, sum Strandferðslan brúkar, lúka nútímanskrøv, tað veri seg myndugleikakrøv, krøv um kapasitet, komfort o.a., er veruliga og einasta loysnin, at flotin verður endurnýggjaður, sum Knud E. Hansen vísti á síni frágreiðing frá 2017.

Samanumtikið eru avbjóðingarnar við nýíløgum í ferjur o.til. og reglunum um løgujáttanir:

1. Nýíløgur í ferjur o.til. og størri viðlíkahald verða tikin við í løgukarmin og skulu tí raðfestast í mun til aðrar løgur hjá landinum
2. Seinastu árini hevur politiski myndugleikin ikki raðfest ferjur frammarlaga, og tí er miðalaldurin á ferjunum høgur
3. Høgur miðalaldur og vantandi íløgur hava við sær høgar útreiðslur til viðlíkahald, men eisini annan rakstur, og at ferjurnar ikki liva upp til nútímanskrøv

5.3. Møguligar loysnir á avbjóðingunum hjá Strandferðsluni

Almenna játtanar- og roknskaparskipanin er ein avbjóðing fyri Strandferðsluna. Tað er ikki játtanarupphæddin í sær sjálvur, sum er avbjóðingin, men heldur er tað stýringin í mun til játtanina, og hvussu gjørt verður av, nær hóskandi íløgur í ferjur og útbúnað skulu gerast.

5.3.1. Strandferðslan sum almennur stovnur

Skal Strandferðslan vera almennur stovnur, er neyðugt at bøta um umstøðurnar hjá henni at virka betri og at leggja til rættis og útinna sítt virksemi.

Fyrst kann nevnast, at tað kundi styrkt um Strandferðsluna, um stovnurin eins og Kringvarpið og Fróðskaparsetrið í størri mun varð óheftur og fekk eitt stýri, sum umrøtt í parti 5.1. Tað hevði verið gjørt við lóg. Endamálið við stýrinum er tað sama sum fyri sjálvstøðugar eindir, sí part 5.3.2, tó at ein almennur stovnur hevur meira avmarkaðar heimildir. Eitt stýri og ein tænastusáttmáli, sí part 4, høvdu byrgt fyri trupulleikanum av, at politiska skipanin hevur lyndi til at leggja seg út í dagliga raksturin hjá stovninum.

Síðani eigur tað at vera gjørligt at áseta ein rakstrarkarm fyri fleiri ár fram í samsvari við tænastusáttmálan, soleiðis at Strandferðslan veit við vissu, hvussu nógv fer at verða játtað komandi árini.

Ein rakstrarkarmur loysir sum so ikki avbjóðingina av ikki at kunna flyta avlop ella hall fram. Fyri at viga upp ímóti tí, kann meir- og minnitørvurin hjá stovninum í árinum verða viðgjørdur við størri vælvild, undir hesum at neyðug upphædd verður játtað, og at umbønir um eykajáttan verða játtaðar við fíggjarnevndarskjølum. Tað er tó neyvan ætlanin, at Fíggjarnevndin skal vera eitt "stempulkontór" hjá Strandferðsluni.

Tá ið tað kemur til íløgurnar, kunnu ferjurnar hjá Strandferðsluni ikki sigast at vera fastar ognir, anlegg e. til., men eru rakstrargøgn, sum eru týðandi partur av rakstrinum – eins og størri maskinur hjá Landsverki ella flogfør hjá Atlantic Airways –, og sum regluliga skulu haldast viðlíka og skiftast út. Tað ber tí til at grundgeva fyri, at ferjurnar skulu viðgerast samsvarandi og ikki setast upp ímóti bygningum, tunlum o.ø. hjá landinum.

Um ferjurnar verða játtaðar sum løgur ella rakstur, hevur tó ikki við sær broytingar í tølunum í fíggjarlógini, samlað sæð. Fíggjarlógin skal vísa tær upphæddir, sum í veruleikanum verða brúktar. Tað má tí roknast at vera minni munur á, um talan verður um rakstur ella løgur, tá ið politiska skipanin skal gera raðfestingar í sambandi við fíggjarlógararbeiðið. Undir øllum umstøðum er tað átrokandi, at Strandferðslan fær játtað pening til nýggjar ferjur.

Skal ein verulig loysn finnast, og Strandferðslan er almennur ella óheftur stovnur, mugu tí broytingar gerast í játtanar- og roknskaparskipanini hjá landinum, soleiðis at tað fer at bera til at flyta avlop og hall fram, og at ferjurnar kunnu avskrivast.

5.3.2. Strandferðslan sum sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag

Annar møguleiki er at gera av, at Strandferðslan verður flutt í ein annan virkisform, sum víst á myndini í parti 5.1. Møguleikarnir eru tá ein sjálvstøðugur almennur stovnur (fyritøka) ella eitt alment partafelag. Aðrir formar verða ikki mettir egnaðir, t.d. eitt íognarfelag ella ein vinnurekandi grunnur, tá ið endamálið er, at landið skal hava fult ræði á Strandferðsluni.

Sjálvstøðuga eindin hevur stýri ella nevnd sum evsta myndugleika mótvegis politiska myndugleikanum, og sum er strategiski samstarvsfelagin hjá stjórnini. Stjórnin hevur tá eitt hóskandi forum til at viðgera ætlanir, avbjóðingar o.a. og skal ikki bert dúva uppá politisku skipanina, sum ikki hevur sama rakstrarliga og handilsliga innlitið. Tað ber til at siga, at sjálvstøðuga eindin er meira vinnuegnað enn ein vanligur almennur stovnur.

Sjálvstøðuga eindin er ikki løgd beinleiðis undir landstýrismannin. Tí er fyriskipanin við tænastusáttmála, sí part 4, eitt vælegnað stýringaramboð hjá politiska myndugleikanum.

Sjálvstøðugir stovnar og almenn partafeløg hava sjálvstøðugan roknskap, t.d. Realurin, Húsalánsgrunnurin og Visit Faroe Islands. Tað ber til at hava avlop og hall, sum kunnu flytast til næsta ár. Tað er eyðvitað av týdningi fyri fyritøkuna, hvussu úrslitið í árinum verður, men tað er ikki so altavgerandi at halda "játtanina" í einstaka árinum, at tað gerst neyðugt at gera tillagingar ella at broyta raðfestingar, sum ikki eru skynsamar fyri fyritøkuna.

Verður Strandferðslan sjálvstøðug eind, fer landið framhaldandi at játta pening til endamálið. Tað kann so vera sum ein stuðulsjáttan, ella at landið keypir tænastuna sambært fleiri ára sáttmála, sum umrøtt í parti 4. Strandferðslan fer enn sum áður at hava sveiggj í rakstinum. Tað kann fyri so vítt viðgerast sum eykajáttan. Men tað er upplagt, at raksturin verður skipaður soleiðis, at hann klárar at rúma sveiggini yvir ár, og sum kann verða betri og bíligari yvir tíð. Tó er onki til hindurs fyri at avtala, at stuðulsjáttanin ella sáttmálin tekur hædd fyri skiftandi rakstri o.ø., t.d. oljuprísir, prístalsviðgerð og inntøkur.

Tað tænir Strandferðsluni at fáa skift eldru ferjurnar út, tað veri seg til betri umstøður, betri rakstur o.a. Hvussu íløgurnar skulu viðgerast, hongur saman við, hvørjar reglur um gjaldføri og roknskap skulu galda. Skal roknskapurin hjá Strandferðsluni, eins og landsroknskapurin, í stóran mun vísa tær upphæddir, sum goldið verður fyri, skulu íløgur útreiðsluførast, tá ið tær verða framdar. Játtanin til Strandferðsluna hevði tá verið ein upphædd til rakstur og ein upphædd til framdar íløgur, t.v.s. sum nú.

Tað mest upplagda er, at t.d. ársroknskaparlógin verður at galda fyri Strandferðsluna. Tá verða íløgur bókaðar sum ognir og avskrivaðar yvir ásett áramál. Játtanin til Strandferðsluna fevnir tá um raksturin íroknað avskrivingar o.a. Tað hevur við sær, at Strandferðslan kann brúka avskrivingarupphæddina til nýíløgur. Er íløgutørvurin størri enn upphæddin, sum er uppsamlað til avskrivingar, má gjaldføri útvegast til tað. Tað kann gerast við láni, sum so verður goldið aftur í takt við, at Strandferðslan fær játtan til raksturin. Ein møguleiki er, at landið útvegar gjaldføri til íløgutørvin, sum Strandferðslan so rindar landskassanum aftur so hvørt. Tað krevur tó neyðuga lógarheimild.

Vansin við at leggja Strandferðsluna í sjálvstøðuga eind er, at virksemið verður lagt uttan fyri fíggjarlógina og nakrar av almennu reglunum. Strandferðslan kann, alt eftir hvussu lógin um Strandferðsluna verður skrúvað saman, í størri mun átaka sær skyldur og fíggjarligar bindingar, og íløgurnar vera ikki við í løgukarminum hjá landinum. Tað ber tó til at áseta, at landsstýrismaðurin skal góðkenna íløgur, sum eru størri enn eitt vist.

Strandferðslan verður flutt longur frá politisku skipan-

Mynd 17 **Nettokostnaður hjá almennum stovni og sjálvstøðugari eind**



Myndin byggir á eina rakstrarjáttan uppá 200 mió. kr. og eina løgujáttan til nýggjar ferjur fyri 300 mió. kr. í 2024-2027, umframt skiftandi viðlíkahald av Smyrli. Íløgurnar hava sparingar við sær uppá níggju mió. kr. um árið. Í tølunum fyri sjálvstøðugu eindina eru rakstrarjáttanin, viðlíkahaldið av Smyrli (javnað yvir árini) og íløgurnar (avskrivaðar yvir 25 ár).

ini, og møguleiki er tí fyri, at innlitið í og ávirkanin á Strandferðsluna verður minni. Tað ber tó til at áseta í lógina, at Strandferðslan skal vera partur av almennum fyriskipanum, t.d. lønar- og roknskaparskipanini, innkeypspolitikkinum og kt-fyriskipanum, fyri at tryggja landinum innlit og góðar fyriskipanir.

Endamálið við fíggjarlógini er at stýra virksemi, skuld o.ø. hjá landinum, og í so máta er síðani kreppuna í 90'unum gjørt eitt miðvíst arbeiði fyri at savna alment virksemi í fíggjarlógina og landsroknskapin. Tað skulu tí góðar grundgevingar til at leggja alment virksemi uttanfyri. Nøkur partafeløg eru stovnað, t.d. Posta og undirsjóvartunlarnir. Sum víst á omanfyri, eru nakrir fyrimunir í at geva Strandferðsluni betri rúmd at leggja til rættis og útinna virksemið. Tað kann tó samstundis vera ein avbjóðing fyri samlaðu stýringina hjá landinum.

Aðrir stovnar kunnu eisini hava avbjóðingar við almennu játtanar- og roknskaparskipanini, men trupulleikarnir koma serliga til sjóndar hjá Strandferðsluni, har virksemið er tengt at rakstrartungum ferjum. Tá ið tað er sagt, hevði tað verið skilagott at endurskoða almennu játtanar- og roknskaparskipanina sum heild.

5.4. Viðurskifti, sum broytast, um Strandferðslan verður sjálvstøðug eind

Sum áður lýst, eru nakrir fyrimunir fyri Strandferðsluna við at leggja stovnin í sjálvstøðuga eind, tá ið tað serliga ræður um játtanar- og roknskaparviðurskifti. Spurningurin er so, hvat tað hevur við sær fyri landskassan, hvørjar reglur skulu galda fyri eindina, og hvussu viðurskiftini skulu vera millum politiska myndugleikan og Strandferðsluna.

5.4.1. Játtan til virksemi

Tað ber til at meta um búskaparliga partin við at hyggja at, hvussu játtanirnar til rakstur og løgur kunnu roknast við at verða, um Strandferðslan er almennur stovnur, og samsvarandi hvussu játtanin til stuðul ella keyp av tænastu fer at vera, um Strandferðslan er sjálvstøðug eind, og at játtanin tá er til rakstur, avskrivingar o.a.

Hjá almennum stovnum eru íløgurnar, sum nú er, útreiðslur í árinum, men hjá sjálvstøðugum eindum verða íløgurnar bókaðar á fíggjarstøðuna og avskrivaðar. Hava

sjálvstøðugar eindir lán, rinda tær rentur. Almennir stovnar fáa gjaldføri frá landinum og rinda ikki rentur; landið rindar tó rentur av lánum. Á mynd 17 eru íløgur hjá Strandferðsluni sum sjálvstøðug eind avskrivaðar yvir 25 ár. Verandi ferjur og avskrivingar eru ikki við her, av tí at tær ikki krevja nakra íløgu. Munurin á strikunum í myndini er sostatt í høvuðsheitum íløgur og avskrivingar.

Sum sæst, fara játtanirnar til rakstur og løgur at vera skiftandi. Játtanin til stuðul ella keyp av tænastu verður javnari, alt eftir avtaluni við Strandferðsluna, undir hesum um lagt verður upp fyri tillagingum í ferðaætlan, prísskipan, oljuprísum, prístali o.s.fr. Myndin er gjørd út frá, at rakstrarligu fortreytirnar eru líka, og tí fer miðalkostnaðurin í longdini nokk ikki at vera so ymiskur, um Strandferðslan verður verandi almennur stovnur, ella um hon verður løgd í sjálvstøðuga eind. Tað snýr seg meira um stýringina og at leggja raksturin til rættis yvir nøkur ár. Roknast má tó við, at betri møguleikar at leggja til rættis fara, sum frá líður, at geva nakrar skilagóðar tillagingar av rakstrinum og tí gera tað bíligari at reka Strandferðsluna.

Leggjast skal afturat, at viðurskifti um skatt, mvg o.a. eru ikki tikin við her. Partafeløg og fleiri sjálvstøðugir stovnar rinda skatt av úrslitinum. Strandferðslan útinnir samferðsluvirksemi við undirtøku frá politiska myndugleikanum. Tað kann tí ikki ætlast, at Strandferðslan skal geva avlop ella hall í miðal yvir árini. Av somu orsøk er vinningsbýti heldur ikki viðkomandi.

Meginparturin av virkseminum hjá Strandferðsluni eru tænastur, sum sambært mvg-lógini eru undantiknar avgjaldsskyldu. Tað merkir, at sølan ikki skal hava mvg, men eisini at mvg av útreiðslum ikki fæst aftur frá TAKS. Roknskapurin hjá Strandferðsluni inniheldur tí eina mvg-upphædd. Roknskapir hjá almennum stovnum skulu tó ikki vísa mvg; tí verður upphæddin ikki tikin við í roknskapin fyri Strandferðsluna. Í 2019 og 2020 var upphæddin um 29 mió. kr.; onnur ár hevur upphæddin verið minni. Mvg-skyldug søla verður avroknað sum vanligt. Verður Strandferðslan sjálvstøðug eind, verða útreiðslurnar hægri við mvg-upphæddini. Men av tí at talan er um pening, sum verður fluttur millum "almennar kassar", hava vit ikki tikið hædd fyri hesum mvg'num í metingini av nettojáttanunum.

Talva 18

Reglur	Almennur stovnur	Sjálvstøðugur stovnur	Alment partafelag
Almennar reglur sum heild	Galda	Fleiri reglur galda, kann velja frá	Galda ikki, kann velja
Serstøk lóg um fyritøku	Ikki neyðug, fíggjarlóg	Neyðug	Neyðug
Játtanarslag	Rakstrarjáttan Løgujáttan	Stuðulsjáttan (Løgujáttan)	Stuðulsjáttan (Løgujáttan)
Gjaldføri og lán	Landskassin, ikki heimild at læna	Egið gjaldføri, heimild neyðug til at læna	Egið gjaldføri og kann læna sjálvt
Roknskaparreglur	Almennar, t.d. ikki flyta úrslit um ár	Ásetast í lóg	Privatar, men kann velja aðrar reglur
Grannskoðanarreglur	Almennar	Almennar	Privatar
Fyrisitingarreglur	Ja	Ja, kann velja frá	Nei, kann velja
Setanar- og lønarviðurskifti	Almenn Góðkenning	(Almenn) (Góðkenning)	Privat, kann velja
Rundskriv, t.d. útboð	Ja	Nei	Nei
Tænastuboð	Ja	Nei, men eftirlit	Nei, men eigari

5.4.2. Hvørjar almennar reglur skulu galda

Tær reglur, sum kunnu galda fyri sjálvstøðuga eindina, kunnu vera ymiskar, alt eftir um talan er um sjálvstøðuga almenna fyritøku ella alment partafelag, sí talvu 18. Sum útgangsstøði er ein sjálvstøðugur stovnur fevndur av fleiri av almennu reglunum, men ásett verður í lógina um stovnin, at ávísar reglur ikki skulu galda, t.d. um roknskap, fíggjarlóg og fyrisiting.

Partafeløg eru fevnd av privatrættarligum reglum, t.d. vinnufelaga- og ársroknskaparlógini. Skulu almennar reglur galda fyri felagið, verður tað ásett í lógini um felagið, t.d. eru ásetingar í lógini um Visit Faroe Islands um játtan í fíggjarlóg, starvsfólkaviðurskifti, innlit o.a.

Serstøk lóg um Strandferðsluna

Ein lóg um Strandferðsluna skal gerast. Er talan um ein sjálvstøðugan stovn, skulu ásetingar um endamál, virksemi, leiðslu, heimildir, roknskap, grannskoðan, eftirlit, kærur o.s.fr. vera í lógini. Í lógunum fyri nakrar av sjálvstøðugu stovnunum er m.a. ásett, at stovnurin skal rinda skatt og lata vinningsbýti, men serliga vinningsbýti er ikki viðkomandi fyri Strandferðsluna.

Verður Strandferðslan partafelag, eru nógv viðurskifti longu ásett í vinnulóggávuni. Lógin um felagið skal tí snúgva seg um endamálið við felagnum, stovningina og umskipanina, herundir heimildina at leggja virksemi, ogn, skuld o.a. í felagið. Tað kunnu vera ásetingar um ymiskar avmarkingar, t.d. at felagið ikki kann stovna nýtt virksemi/felag, og tað ber eisini til at hava ásetingar um heimildir hjá almennum ella politiskum myndugleikum, um fígging og leiðslu. Í lógini um partafelagið fyri Eystur- og Sandoyartunlarnar er m.a. ásett, at landsstýrismaðurin skal góðkenna starvsskipan og samsýningar hjá nevnd og stjórn, treytir við lántøku, Landsverk skal góðkenna tunnilsverkætlanirnar, og landsstýrismaðurin skal góðkenna nýtslugjøldini, um felagið ikki hevur javnvág í rakstrinum.

Lógin um fólka- og farmaflutning verður at galda framhaldandi og snýr seg um tílíkt virksemi sum heild, eins og t.d. lógirnar um fjarskifti og postvirksemi.

Uttan mun til um Strandferðslan verður sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag, eigur lógin um Strandferðsluna at hava ásetingar um fortreytirnar fyri virkseminum, undir hesum serliga um tænastusáttmála við politiska myndugleikan, eftirlit o.a., sí part 4.

Játtan, gjaldføri, roknskapur, grannskoðan o.til.

Stuðulin ella keypið av tænastuni frá Strandferðsluni eigur at verða ein játtan til stuðul ella rakstur. Løgujáttan kann brúkast til íløgur fyri, at realbúskaparligar upphæddir síggjast í játtanarroknskapinum. Tað er tó greitt ein fyrimunur fyri Strandferðsluna, um íløgurnar hjá Strandferðsluni ikki skulu raðfestast saman við øðrum íløgum hjá landinum, og sum áður nevnt, eru ferjurnar meira at rokna sum rakstrargøgn.

Strandferðslan hevur sum sjálvstøðug eind egið gjaldføri til virksemið. Partafeløg kunnu taka lán, men sjálvstøðugir stovnar skulu hava heimild í lóg at gera tað. Óansæð kunnu ásetingar vera í lógini um Strandferðsluna um íløgur og gjaldføri. Ein møguleiki er, at landið útvegar gjaldføri til íløgutørvin, sum Strandferðslan so rindar landskassanum aftur so hvørt.

Strandferðslan hevur sum sjálvstøðug eind egnan roknskap. Eins og hjá partafeløgum og fleiri sjálvstøðugum stovnum verður hildið vera best, at Strandferðslan ger roknskapin eftir ársroknskaparlógini. Hjá sjálvstøðugum stovnum skal roknskapurin leggjast fyri Løgtingið.

Strandferðslan brúkar í dag, eins og aðrir almennir stovnar, Búskaparskipan landsins til lønaravgreiðslur og roknskap. Strandferðslan er eisini partur av øðrum fyriskipanum hjá landinum, t.d. innkeypspolitikkinum og kt-fyriskipanum. Tað hevur ymiskar fyrimunir við sær, t.d. innlit, hagtøl og opinleika. Tað er natúrligt at kanna møguleikan, um Strandferðslan sum sjálvstøðug eind kann halda fram við at brúka skipanina til roknskap og lønir.

Fyrisitingarreglur

Lógirnar um fyrisiting, innlit og Løgtingsins umboðsmann galda fyri alt virksemið hjá almennu fyrisitingini, eisini fyri sjálvstøðugar stovnar, t.d. Húsalánsgrunnin. Verður Strandferðslan sjálvstøðugur stovnur, er útgangsstøðið, at hon verður fevnd av hesum reglum, men ikki um talan er um partafelag.

Havast kann í huga, at virksemið hjá Strandferðsluni

er at veita eina tænastu og ikki at taka fyrisitingarligar avgerðir. Virksemið hjá Strandferðsluni skal útinnast eftir einum sáttmála við politiska myndugleikan, og skipað eftirlit verður við, hvussu sáttmálin verður hildin, sí part 4. Tað verður ikki hildið at vera neyðugt, at fyrisitingarlógin skal galda fyri Strandferðsluna sum partafelag, men tað kann hon í ávísum málum, t.d. starvsfólkamálum, og tað ber eisini til at áseta, at innlitslógin kann galda, sum t.d. hjá Visit Faroe Islands.

Setanar- og lønarviðurskifti

Sjálvstøðugir stovnar fylgja almennum sáttmálum við ávísum tillagingum. Partafeløg eru partur av privata arbeiðsmarknaðinum. Tað ber tó til t.d. at áseta, at eitt alment partafelag yvirtekur verandi skyldur hjá almennum stovni, og at sáttmálar eru við verandi fakfeløg.

Tá ið Telefonverkið varð umlagt til partafelag, varð ein arbeiðsbólkur – umboðandi stjórn, starvsfólk, fakfelag umframt ein grannskoðari – settur at gera eina frágreiðing um, hvussu stovnurin átti at verða skipaður í framtíðini. Um starvsfólkaviðurskiftini var bólkurin samdur um, at starvsfólkaviðurskiftini ikki skuldu versna. Skal Strandferðslan verða partafelag, verður mælt til, at starvsfólkaviðurskiftini verða viðgjørd í samstarvi við starvsfólk og fakfeløg, og at ásetingar um starvsfólkaviðurskiftini verða í lógini um Strandferðsluna.

Tænastuboð og rundskriv

Er Strandferðslan sjálvstøðug eind, kann landsstýrismaðurin ikki geva tænastuboð sum við almennum stovnum. Heldur ikki galda rundskriv við heimild í málsøkjabýtinum hjá løgmanni, hóast tað sum oftast kann vera skilagott at fylgja almennum meginreglum um t.d. útboð.

Landsstýrismaðurin hevur ábyrgd av fyrisitingini av málsøkjunum, sum eru løgd til hansara. Men við sjálvstøðugum stovnum, sum eru skipaðir sambært lóg, snýr ábyrgdin seg um at hava eftirlit við stovninum, og við partafeløgum fevnir ábyrgdin um at røkja eigaraleiklutin, um aðrar serligar ásetingar ikki eru í lógini um partafelagið.

Viðurskiftini millum politiska myndugleikan og Strandferðsluna hava stóran týdning, tí at tað snýr seg um samferðslumøguleikar í Føroyum. Politisku ynskini eiga tó at verða betur skipað í hóskandi og fastar karmar sum við einum tænastusáttmála, eftirliti o.ø., sum viðgjørt í parti 4. Endamálið er, at tað skal vera greitt, hvat politiski myndugleikin væntar, at Strandferðslan fær lagt rakstur og løgur til rættis eftir skipaðu ynskjunum, og at skipað eftirlit er við tí.

5.4.3. Sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag

Um Strandferðslan skal vera sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag, er ein politisk avgerð. Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin út frá einari meting av, hvør fyriskipan er best egnað til tørvin hjá Strandferðsluni, hvør loysn er væl roynd áður og er vinnuegnað, og hvat er mest einfalt at gera við lóggávu o.ø. Vit hava lagt dent á m.a. hesi viðurskifti:

- At Strandferðslan hevur greiða veitingarskyldu sambært lógini um Strandferðsluna, og at sáttmáli verður gjørdur við politiska myndugleikan um tænastu
- At Strandferðslan kann skipa virksemið skynsamt yvir fleiri ár
- At Strandferðslan kann gera neyðugar íløgur at svara tørvinum nú og nøkur ár fram
- At Strandferðslan skal hava inntøkur
- At Strandferðslan skal rekast í so stóran mun sum gjørligt á handilsligum støði
- At Strandferðslan útveitir partar av virkseminum til privatar fyritøkur
- At Strandferðslan so frítt sum møguligt skal hava møguleika at kunna samstarva og gera avtalur við kommunur, fyritøkur og aðrar partar
- At reglurnar um partafeløg eru væl kendar og vinnuegnaðar, umframt at tað ikki er neyðugt at hava fleiri ásetingar, sum skulu greina, hvat virkiseindin er og kann
- At landsstýrið hevur fult ræði á partafelagnum sum eigari og lóggevi

Í arbeiðinum við frágreiðingini hava vit kunnað okkum um, hvussu grannalondini gera. Sum greitt frá í parti 4.3, verða sáttmálar gjørdir um samferðslu. Veitararnir eru privat partafeløg, men tað eru eisini partafeløg, sum landið ella kommunur eiga. Onkur dømi eru, har veitarin ikki er partafelag, t.d. DSB, sum er ein sjálvstøðug almenn

fyritøka, og Metroselskabet, sum er eitt íognarfelag saman við kommunum í Keypmannahavn og Frederiksberg. Sum heild er talan um eindir, sum hava sjálvstøðugt búskaparligt rensl. Vit eru ikki komin á nakað dømi sum í Føroyum, at ein almennur stovnur rekur alla almenna samferðslu í landinum.

Tað er avgerandi, at Strandferðslan sjálvstøðugt kann útinna og leggja til rættis virksemi og løgur. Arbeiðsbólkurin heldur, at tað málið kann røkkast við at skipa Strandferðsluna sum ein sjálvstøðugan stovn ella eitt alment partafelag við einari lóg um Strandferðsluna. Skal Strandferðslan halda fram sum almennur stovnur, eigur stýri at verða sett fyri stovnin, umframt at broytingar mugu gerast í játtanar- og roknskaparskipanini, soleiðis at møguligt verður at flyta avlop og hall fram, og at íløgur í rakstrargøgn kunnu avskrivast o.a.

5.5. Samanumtøka

Strandferðslan er fevnd av almennum reglum. Sambært játtanar- og roknskaparskipanini fær stovnurin eina árliga játtan til virksemið, men tað ber ikki til at hava avlop ella hall.

Stór sveiggj í rakstrinum hjá stovninum av serliga skiftandi oljuprísi og viðlíkahaldi hava við sær, at stýringin í mun til játtanina fyllir nógv. Tillagingar, sum ikki altíð er skynsamar, mugu gerast innan fíggjarárið, og frávik í mun til játtan skulu viðgerast við eykajáttan í Løgtinginum, sum tekur tíð. Fyriskipanin við árligum játtanum hevur eisini við sær, at umstøðurnar at leggja ætlanir fyri fleiri ár ikki eru tær bestu.

Nýíløgur í ferjur o.tíl. og størri viðlíkahald verða játtað fyri seg í løgujáttan og raðfest saman við øðrum løgum hjá landinum. Fyriskipanin er ikki ein fyrimunur, tá ið Strandferðslan skal leggja virksemi og løgur til rættis, og er ein orsøk til, at miðalaldurin á ferjunum er høgur, og at fleiri íløgur ikki verða gjørdar. Tað hevur við sær høgar útreiðslur til viðlíkahald, men eisini annan rakstur, umframt at ferjurnar ikki liva upp til nútímanskrøv.

Skal Strandferðslan vera almennur stovnur, er neyðugt at bøta um umstøðurnar hjá henni at virka betri og at leggja til rættis og útinna sítt virksemi. Tað ber til at seta eitt stýri fyri stovnin og at áseta ein rakstrarkarm fyri fleiri ár í samsvari við tænastusáttmálan. Tað hevði byrgt fyri trupulleikanum av, at politiska skipanin hevur lyndi til at leggja seg út í raksturin, og Strandferðslan hevði vitað við vissu, hvussu nógv fer at verða játtað komandi árini.

Ein rakstrarkarmur loysir ikki avbjóðingina av ikki at kunna flyta avlop ella hall fram. Fyri at viga upp ímóti tí, kann meir- og minnitørvurin hjá stovninum í árinum verða viðgjørdur við størri vælvild og skjótari játtaður við fíggjarnevndarskjølum. Tað er tó neyvan ætlanin, at Fíggjarnevndin skal vera eitt "stempulkontór" hjá Strandferðsluni.

Ferjurnar hjá Strandferðsluni eru rakstrargøgn og eiga at verða viðgjørdar samsvarandi og ikki verða settar upp ímóti bygningum, tunlum o.ø. hjá landinum. Um ferjurnar eru løgur ella rakstur, hevur ikki við sær broytingar í tølunum í fíggjarlógini, samlað sæð. Tað verður tí neyvan munur á, tá ið politiska skipanin skal gera raðfestingar í fíggjarlógini. Undir øllum umstøðum er tað átrokandi, at

Strandferðslan fær játtað pening til nýggjar ferjur.

Skal ein verulig loysn finnast, og Strandferðslan er almennur stovnur, mugu tí broytingar gerast í játtanar- og roknskaparskipanini hjá landinum, soleiðis at tað fer at bera til at flyta avlop og hall fram, og at ferjurnar kunnu avskrivast.

Ein annar møguleiki er at flyta Strandferðsluna í sjálvstøðugan stovn (fyritøku) ella alment partafelag. Tílíkar sjálvstøðugar eindir hava stýri ella nevnd sum evsta myndugleika mótvegis politiska myndugleikanum, og sum er strategiski samstarvsfelagin hjá stjórnini. Stjórnin og nevndin/stýrið hava tá eitt hóskandi forum til at viðgera ætlanir, avbjóðingar o.a. Fyri sjálvstøðugar eindir er fyriskipanin við tænastusáttmála eitt vælegnað stýringaramboð.

Sjálvstøðugar eindir hava sjálvstøðugan roknskap, og tað ber til flyta avlop og hall fram. Úrslitið í árinum hevur sjálvsagt týdning, men tað er ikki so altavgerandi at halda "játtanina" í árinum, at tað gerst neyðugt at gera tillagingar, sum ikki eru skynsamar fyri fyritøkuna.

Verður Strandferðslan sjálvstøðug eind, letur landið eina árliga stuðulsjáttan, ella keypir eina tænastu, og so má Strandferðslan skipa ein rakstur, sum klárar at rúma sveiggum yvir ár. Tó er onki til hindurs fyri at taka hædd fyri t.d. skiftandi oljuprísum. Játtanin frá landinum er til rakstur, avskrivingar o.a. Strandferðslan ger sjálv neyðugar íløgur og avskrivar tær. Tað ber til at áseta, at landsstýrismaðurin skal góðkenna íløgur, og at landið letur gjaldføri.

Tað eru soleiðis nakrir greiðir fyrimunir við at leggja Strandferðsluna í sjálvstøðuga eind. Fyri landskassan kann roknast við einari meiri javnari játtan, men í longdini fer miðalkostnaðurin ikki at vera so ymiskur. Tað snýr seg um stýringina og at leggja raksturin skynsamt til rættis. Roknast má tó við, at betri møguleikar at leggja til rættis fara, sum frá líður, at geva nakrar skilagóðar tillagingar av rakstrinum og tí gera tað bíligari at reka Strandferðsluna.

Ein serstøk lóg skal gerast fyri Strandferðsluna við neyðugum ásetingum. Í lógini skulu vera ásetingar um serlig atlit og fortreytir fyri virkseminum, undir hesum um tænastusáttmála við politiska myndugleikan, eftirlit o.a. Endamálið er, at tað skal vera greitt, hvat politiski myndugleikin væntar, at Strandferðslan fær lagt rakstur og løgur til rættis eftir skipaðu ynskjunum, og at skipað eftirlit er við tí.

Um Strandferðslan verður partafelag, eigur støða at verða tikin til, um innlitslógin skal galda, og møguliga fyrisitingarlógin í ávísum málum. Í setanar- og lønarviðurskiftum kann felagið yvirtaka verandi skyldur hjá stovninum, og felagið kann gera sáttmála við verandi fakfeløg. Starvsfólkaviðurskiftini eiga at verða viðgjørd í samstarvi við starvsfólk og fakfeløg. Eisini má greiða fáast á, hvussu Strandferðslan skal vera partur av almennum fyriskipanum, t.d. lønar- og roknskaparskipanini, innkeypspolitikkinum og kt-fyriskipanum.

Í spurninginum, um Strandferðslan skal vera sjálvstøðugur stovnur ella alment partafelag, er tað avgerandi, at Strandferðslan fær ein bygnað, sum er væl royndur áður, er vinnuegnaður, og har Strandferðslan sjálvstøðugt kann útinna og leggja til rættis virksemi og løgur. Arbeiðsbólkurin heldur, at tað málið kann røkkast við at skipa Strandferðsluna sum ein sjálvstøðugan stovn ella eitt alment partafelag. Skal Strandferðslan vera almennur stovnur, eigur stýri at verða sett fyri stovnin, umframt at játtanar- og roknskaparskipanin má broytast til, at stovnar kunnu hava avlop og hall, rakstrarligar avskrivingar o.a.

Arbeiðssetningur
hjá arbeiðsbólkinum

Skjal 1.
Arbeiðssetningur fyri arbeiðsbólkin fyri Strandferðsluna

Strandfaraskip landsins er ein av stóru og mest týðandi stovnum landsins, fyri borgarar, tað almenna, og vinnuna. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og landsstýrið ynskja tí at fáa lýst og mett um virksemið hjá Strandferðsluni og gera uppskot til broytingar og betringar.

Arbeiðið skal snúgva seg um

1. Søguligt baksýni og eina lýsing av stovninum, herundir lógargrundarlag og játtanir
2. Stýrisslag
   a. Lýsa fyrimunir og vansar við ymiskum stýrisløgum av stovninum
      i. Landsstovnur
      ii. Landsfyritøka við serlóg ella dagførdum játtanarreglum
      iii. Alment partafelag
   b. Hvussu stýringin kann vera millum land og stovn/fyritøku við tænastusáttmála
3. Rakstrarfelag ella planleggjari ella bæði
   a. Meta um, um Strandferðslan framhaldandi skal vera operatørur, ella skal Strandferðslan standa fyri at fyrireika, keypa inn og planleggja almennu samferðsluna
4. Hvørjar tænastur skal Strandferðslan veita
   a. Við tíðini er vegakervið broytt, tunlar komnir, og kommunumørkini eru flutt. Virkir og landsstovnar eru broyttir. Hvat eigur at vera landsuppgávur, og hvat eigur at vera kommunalar uppgávur. Hvussu skal prísásetingin gerast, og hvussu skal frekvensurin planleggjast.
5. Tilmæli um broytingar um stýrisslag, rakstrarslag og tænastuslag

Til at fremja uppgávuna setir landsstýrismaðurin ein arbeiðsbólk við neyðugari vitan og sakkunnleika at greina arbeiðssetningin. Arbeiðsbólkurin kann brúka uttanhýsis konsulentar at gera ella at hjálpa við arbeiðinum.

Manning av arbeiðsbólkinum

Ynski er, at arbeiðsbólkurin er mannaður við uttanhýsis fólki. Hetta fyri at tryggja eitt óheftni í sjónarmiðunum, men við fólki sum hava grundleggjandi vitan um tað, sum skal viðgerast. Arbeiðsbólkurin skal hava vitan um mannagongdir í sambandi við reiðarívirksemi og at reka eitt ferðafólka- og farmafelag. Eisini er neyðugt at hava vitan um, hvussu tað er at reka alment virksemi í ymiskum formum og avmarkingum, og sum partvíst er handilsligt grundað.

Hjáknýtt arbeiðsbólkinum verður eitt skrivaratoymi, sum er mannað við fólkum frá Fíggjarmálaráðnum og Strandferðsluni. Skrivaratoymið hevur ábyrgdina av at finna fram og greina tilfar og at skriva frágreiðingina eftir fyriskipan og leiðbeining frá arbeiðsbólkinum. Eftir avtalu við stjóran á Strandferðsluni og aðalstjóran í Fíggjarmálaráðnum mannar arbeiðsbólkurin skrivaratoymið.

Tíðarætlan

Byrjað verður 1. juni 2021 – og skal vera liðugt í seinasta lagi 30. november 2021.

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ